# GERÐABÓK

**Dato:** 24. november 2022 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 252/22 – 271/22**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Jón Kragesteen (fyri Elsu Berg)
Jákup Dam
Turid Horn (fyri Gunvør Balle)
Kristian Martin Skála (fyri Anniku Olsen
Birgir Nielsen
Ruth Vang

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Bogi Jacobsen
Eyðna Justinussen
Jóan Petur Hentze
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**
Elsa Berg
Annika Olsen
Gunvør Balle

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 252/22 | 22/06846-1 | Gunvør Balle berst frá at møta á býráðsfundi 24.11.2022 | 976 |
| 253/22 | 22/06845-1 | Annika Olsen berst frá at møta á býráðsfundi 24.11.2022 | 977 |
| 254/22 | 22/06878-1 | Elsa Berg berst frá at møta á býráðsfundi 24.11.2022 | 978 |
| 255/22 | 22/00011-1 | Mál beind í nevndir 2022 | 979 |
| 256/22 | 21/03637-14 | Matr.nr. 138dn, Hoyvík. Afturkeyp/makaskifti. | 981 |
| 257/22 | 21/04626-9 | Uppskot frá Traðarmannafelagnum um at broyta verandi traðarleigusáttmála. | 984 |
| 258/22 | 22/02376-2 | Høli til frítíðarskúla og ungdómstilboð í Kaldbak | 988 |
| 259/22 | 22/04673-1 | Fíggjarstøða Ítróttaanlegg | 992 |
| 260/22 | 22/04616-1 | Fíggjarstøðan hjá Skúlanum á Fløtum | 995 |
| 261/22 | 22/06065-1 | Flyting millum rakstrarstøð av játtan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni | 998 |
| 262/22 | 22/06702-1 | Sáttmáli um keyp av lendi matr. nr. 807a, KFUK | 1000 |
| 263/22 | 17/03196-1 | Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 1002 |
| 264/22 | 22/05694-1 | Íbúðarbygging undir Fjalli matr. nr 1108 og 1107, Tórshavn | 1016 |
| 265/22 | 21/02196-2 | Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK | 1019 |
| 266/22 | 19/01811-2 | Marknaumskipan millum matr. nr. 216a, 216b og litra, Kollafirði í sambandi við gerð av gongubreyt | 1026 |
| 267/22 | 22/01300-1 | Útskifting av maskinu til jarnplássið hjá Kommunalu Brennistøðini | 1029 |
| 268/22 | 22/02522-1 | Dagføring av reinsiverkinum í Havnardali | 1032 |
| 269/22 | 22/06615-1 | Eykajáttan av meirinntøkum 2022 | 1036 |
| 270/22 | 22/04851-1 | Fíggjarætlan 2023, Tórshavnar kommuna | 1038 |
| 271/22 | 22/00009-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022 | 1051 |

**Til viðgerðar**

## 252/22 Gunvør Balle berst frá at møta á býráðsfundi 24.11.2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 252/22 | 22/06846-1 |

**Málslýsing**
Gunvør Balle hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Turið Horn, eru loknar.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Tikið til eftirtektar.

## 253/22 Annika Olsen berst frá at møta á býráðsfundi 24.11.2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 253/22 | 22/06845-1 |

**Málslýsing**
Annika Olsen hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Kristian Martin Skála, eru loknar.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 254/22 Elsa Berg berst frá at møta á býráðsfundi 24.11.2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 254/22 | 22/06878-1 |

**Málslýsing**
Elsa Berg hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jón Kragesteen, eru loknar.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 255/22 Mál beind í nevndir 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 3/22 | 22/00011-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 25/22 | 22/00011-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 55/22 | 22/00011-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 82/22 | 22/00011-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 108/22 | 22/00011-1 |
| 6 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 134/22 | 22/00011-1 |
| 7 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 178/22 | 22/00011-1 |
| 8 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 194/22 | 22/00011-1 |
| 9 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 228/22 | 22/00011-1 |
| 10 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 255/22 | 22/00011-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. november 2022 | Blað nr.: 980<br>Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið til eftirtektar**.**

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 256/22 Matr.nr. 138dn, Hoyvík. Afturkeyp/makaskifti.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 27/22 | 21/03637-14 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 26/22 | 21/03637-14 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 285/22 | 21/03637-14 |
| 4 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 256/22 | 21/03637-14 |

**Upprunin til málið** Kommunan hevur tørv á at keypa matrikkul nr. 138dn, til felagshús. Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll.

**Lýsing av málinum**

Kommunan arbeiðir við at gera eina heildarætlan fyri Karlamagnussarbreyt, sí mál 20/00622 og umfatar ein partur av heildarætlanini, at skipa økið kring Hoyvíksvøll, sí mál 20/00040 og viðheft kortskjal skjal 20/0040-2.

Framtíðarskýlið v/felagshølum ætlast at verða staðsett á vestursíðuni, men verður framhaldandi stórur partur av brúkarunum/áskoðarunum at koma til vøllin frá eystursíðuni, tvs. Karlamagnusarbreyt. Í uppskotinum er felagshús sett á matrikkulin. Frammanfyri ber eisini til at gera skráa við tribunum. Í mun til vøllin og nýtsluna har, verður tí tørvur á fasilitetum, sum kundu staðið á teimum báðum matrikklunum, sum hoyra til útstykkingina á Karlamagnussarbreyt – tað veri seg goymsla, almenn vesi ella eitthvørt borgaravent endamál í Hoyvík. Kommunan hevur havt samráðingar við eigaran av matr.nr. 138dn, um keyp.

Meklarafelagið Skyn, gjørt virðis virðismeting av grundstykkinum og fyriliggur eisini virðismeting av møguligum makaskiftis grundstykki. Matr.nr. 135nn, Hoyvík.

| Matr. nr. | Vídd m2. | Mest loyvda bygging. | Mett virði |
|---|---|---|---|
| 138dn | 176+175 = 351 | 528 | 2.600.000 |
| 135nn | 427 | 252,6 | 1.400.000 |
| Munur | | | 1.200.000 |
| Útreiðslur eigarans til fyrireikandi bygging. | | | 406.000 |
| Endurgjald tls. | | | 1.606.000 |

Eigari er sinnaður til at fremja makaskifti millum matr.nr. 138dn og 135nn, og at fáa munin í virði 1,2 mill kr. um hann harumframt kann fáa endurgjald fyri tær útreiðslur hann hevur havt til fyrireikandi bygging á matr.nr. 138dn, Hoyvík.

Hann vísir á, at av tí at tað er Tórshavnar kommuna sum ynskir byggiverkætlanina at støðga, má Tórshavnar kommuna bera kostnaðin av hesum útreiðslum sum verða uppgivnar til 0,406 mill. kr. Harumframt skal Tórshavnar kommuna eisini bera allan kostnað av at fremja ætlanina.

Eitt møguligt makaskifti krevur loyvi frá Kommunala eftirlitinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn
Við heimild í § 44, stk. 1, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin) verður ásett:
**§ 1.** Um ikki annað er ásett í lóggávuni, skal fastogn hjá kommununi verða boðin út alment, áðrenn ognin verður seld, sbr. tó § 2.
**§ 2.** Fastogn nýtist tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um
*Stk. 2.* Við góðkenning frá landsstýrismanninum kann verða vikið frá kravinum um alment útboð í sambandi við makaskifti og tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kann verða seld uttan alment útboð.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

Virðismetingar, matr.nr.138dn og 135nn.
Málsviðgerð 20/00622 Heildarætlan fyri Karlamagnussarbreyt.
Málsviðgerð 20/00040 Skipan av økinum kring fótbóltsvøllin.
Kort skipan av økinum kring fótbóltsvøllin.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at gera eina avtalu við verandi eigarar av matr.nr. 138dn, um møguligt makaskifti.

Avtalan umfatar, at kommunan keypir matr.nr. 138dn, fyri 2,6 mill. kr. og keypir eigari av matr.nr. 138dn óbygda grundstykkið matr.nr. 135nn frá Tórshavnar kommunu fyri 1,4 mill. kr.

Munurin í virði 1,2 mill. kr. verður rindaður eigara. Kommunan gongur ikki ynski eigarans á møti, um at endurrinda 0,406 mill. kr. fyri útreiðslur. Kommunan rindar allar útreiðslur í samband við avgreiðslu av makaskiftismálinum. Mettar útreiðslur til tinglýsing eru uml. tkr. 42.

Avtalan er treytað av góðkenning frá kommunala eftirlitinum.
Fígging av keyp/sølu konto 6175.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Eigari av matr.nr. 135nn, Hoyvík, hevur í brævi dagfest 31.10.22, vent sær til kommununa viðvíkjandi stykkinum matr.nr. 135nn, Oman Gil, sum hann hevur fingið í makaskifti við matr.nr. 138dn, á Karlamagnussarbreyt.

Stykkið matr.nr. 135nn, var av Meklarafelagnum Skyn, virðismett til eitt marknaðarvirði á 1,4 mill. kr. sum er søluprísurin í makaskiftisskeytinum.

**Tilmæli.**

Vísandi til, at talan er um eitt makaskiftis grundstykkið, mælir kommunustjórin til, at loyva verandi eigara at selja stykkið matr.nr. 135nn, Hoyvík, í fríðari sølu.

Víðarisøluskeytið skal vísa til verandi tinglýstar servituttir.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt.

# 257/22 Uppskot frá Traðarmannafelagnum um at broyta verandi traðarleigusáttmála.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 206/22 | 21/04626-9 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 261/22 | 21/04626-9 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 284/22 | 21/04626-9 |
| 4 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 257/22 | 21/04626-9 |

**Upprunin til málið.** Áheitan frá Havnar Traðarmannafelag um at broyta ásetingarnar í verandi traðarleigusáttmála, j.nr. 21/04626-1 og 21/04626-3.

**Lýsing av málinum.**
Tórshavnar kommuna hevur 108 leigutraðir, sum verða leigaðar borgarum í kommununi til búnaðarendamál, seyðahald, til gæs og til beiti til ross.

Havnar Traðarmannafelag røkir áhugamálini hjá teimum, ið hava trøð til leigu frá Tórshavnar kommunu, og í áheitanini frá felagnum verður víst á ymisk viðurskifti, ið kunnu bøta um umstøðurnar hjá traðarleigarunum.

Í høvuðsheitum eru ynskini frá Havnar Traðarmannafelag hesi:

- Javnbjóðis rættindi at ættarliðsskifta trøðna, so hon kann verða latin víðari til arvingarnar, um hjúnafelagi ikki ynskir at yvirtaka leigumálið
- Rættur at leggja el og vatn inn á trøðna
- Ynski um at byggja størri hús á trøðni
- Nágreiningar av ásetingum um endurgjald í sambandi við uppsøgn

Umsitingin hevur mett um áheitanina frá Traðarmannafelagnum og gjørt uppskot til nýggjan traðarleigusáttmála, ið skal vera galdandi fyri øll traðarleigumál fram eftir, sí uppskot til sáttmála j.nr. 21/04626-11**.**

Uppskotið loyvir øllum traðarleigarum at ættarliðsskifta eina ferð, soleiðis at trøðin kann verða latin víðari eina ferð til lívsarvingar. Á henda hátt verða allir traðarleigarar javnsettir, tí verandi sáttmáli loyvir bert teimum, ið hava sáttmála frá tíðini áðrenn 15. desember 2005 at ættarliðsskifta eina ferð.

Uppskotið leggur upp til, at leigusáttmálin er galdandi í fimm ár móti trimum í verandi sáttmála, og at leigumálið kann verða endurnýggjað, um viðurskifitni á trøðni eru nøktandi, og ásetingarnar í leigusáttmálanum verða hildnar.

Uppskotið loyvir traðarleigarunum at leggja el og vatn til trøðna fyri egnan kostnað.

At enda nágreinar uppskotið viðurskiftini viðvíkjandi endurgjaldi fyri hegn og arbeiðsskúr, tá ið kommunan sigur leigumálið upp.

Samstundis sum uppskotið, verður tað samtykt, ásetur, at allir traðarleigarar kunnu lata trøðna víðari til lívsarvingar eina ferð, verður skotið upp, at allar traðir, ið eru størri enn 9.000 m² og 14.000 m², verða lutaðar sundur í ávikavist tvey og trý, áðrenn tær verða latnar víðari til lívsarvingar.

46 traðir eru størri enn 9.000 m², og verða hesar sostatt lutaðar sundur í tveir ella tríggjar lutir, tá ið tær verða ættarliðsskiftar ella koma inn aftur til kommununa eftir lokið leigutíðarskeið.

Á henda hátt fáa fleiri fólk møguleika at fáa eina trøð, tá ið hesar verða latnar inn aftur til kommununa og áðrenn tær verða latnar víðari til lívsarvingar.

Umleið 500 fólk standa í løtuni á bíðilista at fáa eina trøð frá kommununi, og miðal bíðitíðin er long, áðrenn umsøkjarar fáa tilboð um at fáa leigutrøð. Bert níggju umsøkjarar, ið hava staðið á bíðilistanum, hava fingið leigutrøð seinastu 17 árini.

Av teimum, ið høvdu leigusáttmála frá tíðini áðrenn 15. desember 2005, hava 45 ættarliðsskift trøðna, tey leigaðu frá kommununi. Hesi kunnu sostatt ikki ættarliðsskifta aftur, og tá ið hesi leigumálini ganga út, verða traðirnar latnar inn aftur til kommununa og lutaðar út millum umsøkjarar á bíðilistanum.

54 aðrir traðarleigarar hava sáttmála frá tíðini áðrenn 15. desember 2005 og kunnu sostatt ættarliðsskifta trøðna eina ferð.

Níggju leigarar hava sáttmála frá tíðini eftir 15. desember 2005 og verða fevndir av nýggju ásetingini um ættarliðsskifti, um býráðið tekur undir við uppskotinum til nýggjan leigusáttmála. Hesir níggju leigarar kunnu tá ættarliðsskifta trøðna eina ferð.

Viðvíkjandi áheitanini um at fáa loyvi til at byggja størri hús á trøðjna, mælir umsitingin frá hesum. Traðarleigumál eru roknaði til búnaðarendamál, og mett verður, at ein arbeiðs- og reiðskapsskúrur er nøktandi til hetta endamálið.

Verður loyvi givið til at byggja størri hús, dettur endamálið við traðarleigumálunum burtur, og leigumálini flyta seg meira til at verða summarhúsbrúk. Hetta seinasta loyva hvørki byggisamtykt ella náttúrufriðingarlóggáva, tá ið talan er um uttangarðsjørð.

Samanumtikið verður mett, at omanfyrinevndu broytingar eru ein bati hjá teimum, ið hava traðarleigumál, og at broytingarnar somuleiðis bøta um útlitini og møguleikarnar hjá fleiri havnarborgarum at fáa eina trøð.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu
Løgtingslóg um náttúrufriðing

**Upplýsingar frá umsitingini**
*492 umsøkjarar standa á bíðilista til leigutrøð*
*108 leigumál á leigutraðum í alt í Tórshavnar kommunu*
*45 leigarar hava søkt um og fingið ættarliðsskift trøðna til lívsarvingar*
*54 leigarar hava sáttmála frá tíðini áðrenn 15. desember 2005, og hava hesir ikki søkt um ella fingið ættarliðsskift til lívsarvingar*
*9 leigarar hava sáttmála frá tíðini eftir 15. desember 2005 og kunnu ikki ættarliðsskifta til lívsaravingar sambært galdandi sáttmála.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

21/04626-10 Býráðssamtykt 11.10.07
21/04626-11 Uppskot til nýggjan traðarleigusáttmála við vístum broytingum
21/04626-3 Traðarsáttmáli – uppskot frá Traðarmannafelagnum 21. feb. 2022

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:** Virkandi kommunustjóri og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at taka støðu til uppskot til nýggjan traðarleigusáttmála og at beina málið í býráðið, um tikið verður undir við at endurskoða sáttmálan.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Útsett

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at ættarliðsskifti av traðunum fer at avmarka møguleikarnar hjá borgarunum at fáa eina leigutrøð.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Heðin Mortensen fór av fundinum, tí hann var ógegnigur at luttaka í viðgerðini. Kristianna Winther Poulsen tók sæti í hansara stað.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Annfinnur Brekkstein legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Skotið verður upp at loyva øllum traðarleigarum at leggja inn vatn og el til trøðna fyri egnan kostnað. Harumframt verður skotið up, at farið verður undir at gera eina heildarætlan fyri traðir og at kanna, um møguligt er at útvega fleiri traðir.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Annfinni Brekkstein, ið varð einmælt samtykt.

Heðin Mortensen og Kári Johansen boðaðu frá, at av tí at teir báðir hava leigutrøð, meta teir seg at vera ógegnigar at luttaka í viðgerðini av málinum. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar, og Heðin Moertensen og Kári Johansen luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

## 258/22 Høli til frítíðarskúla og ungdómstilboð í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 17.08.2022 | 170/22 | 22/02376-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 195/22 | 22/02376-2 |
| 3 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 183/22 | 22/02376-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2022 | 206/22 | 22/02376-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 278/22 | 22/02376-2 |
| 6 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 258/22 | 22/02376-2 |
| 7 Mentamálanevndin | | | 22/02376-2 |

**Upprunin til málið**
Samtykt frá mentamálanevndini tann 9. mars 2022 í máli nummar 22/00948 um útvegan av hølum til frítíðarskúla í Kaldbak

**Lýsing av málinum**
Neyðugt er at útvega frítíðarskúlanum og ungdómstilboðnum í Kaldbak nýggj høli. Til fyri kortum hevur frítíðarskúlin og ungdómstilboðið hildið til í Flatnagarði, sum er dagstovnur. Flatnagarður rúmar tó ikki øllum børnunum, og tí hevur frítíðarskúlin í eina tíð verið í skúlanum.

Hetta hevur víst seg ikki hepnast so væl, tí frítíðarskúlavirksemið ávirkar undirvísingina, og at umstøðurnar annars ikki eru so væl egnaðar til námsfrøðiliga virksemið.

Hetta skúlaárið verða tað skúlaár 16 frítíðarskúlabørn. Í Kaldbaks skúla verður forskúli eftir summarsteðgin, og við hesum verður frítíðarskúlin fyri fýra floksstigum. Hesi rúmast ikki í verandi hølum í skúlanum, ei heldur á dagstovninum.

Átroðkandi tørvur er tí at fáa loyst hølisspurningin fyri frítíðarskúlan og ungdómstilboðið í Kaldbak, soleiðis at hetta kann standa klárt eftir summarsteðgin.

Viðvíkjandi varandi loysn, so er eftir ástaðarfund, har umboð fyri bygingsdeildina, barna- og ungdómsdeildina, dagstovnaleiðalran o.ø. vóru við, semja um, at besa besta loysnin er at útvega ella byggja lonir, sum eru í umhvørvinum við skúlan, nýggju høllina og spæliplássið. Hóast at talan er um tvær verkætlanir, so er vert at kanna, um bygging av frítíðarskúla og høll kann samskipast í ávísan mun.

Komandi skúlaár verða 16 næmingar í frítíðarskúlanum. Fyri at tryggja, at ein loysn eisini heldur í fleiri ár fram, ið kann lofta einum vaksandi barnatalið í Kaldbak, verður mett neyðugt at byggja høli, sum kunnu rúma upp til 26 næmingum.

Samstundis vil ein hølisloysn til frítíðarskúlan og ungdómstilboðið eisini gera, at trýstið á dagstovnin minkar.

Sum fyribilsloysn er semja við samkomuna Nazareth um leigu av hølum til frítíðarskúla. Hetta er beint við skúlan. Leigumál verður lagt fyri fíggjarnevndina (mál 22/03249).

**Krøv til nýggj høli**
Neyðugt er við einari loysn, sum kann rúma upp til 26 frítíðarskúlanæmingum, umframt starvsfólkum og ungdómsklubbanum.

Ein hóskandi loysn má tí í minsta lagi innihalda inngongd og garderobu, har tað er lætt at lata seg í/úr útiklæðum, tvey vesi til børnini, tvey rúm, har eitt er felagshøli og hitt aktivitetsrúm/verkstaður, køk ella køksøki í felagshølinum, starvsfólkarúm og starvsfólkavesi. Umframt hetta er eisini neyðugt við rúmi til reingerð og tekniskar installatiónir.

**Fyrireikingar**
Bygningsdeildin hevur mett tørv á játtan í sambandi við fyrireikingar til útbjóðing av verkætlanini í heildararbeiðstøku. Mett verður, at upphædd kr. 300.000 er nøktandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Leigumál Nazareth 22/03249)

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | Ja | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at játta kr. 300.000 til fyrireikingar og at fáa til vega kostnaðarmeting av nýggjum hølum til frítíðarskúla og ungdómstilboð í Kaldbak av løgukarmi LK31015 Tillagingar á dagstovnaøkinum til nýggja løgukontu Frítíðarskúli í Kaldbak, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið. Harumframt verður mælt til at beina staðseting av hesum bygningi í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndinin og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við broyting av byggisamtykt og staðseting av nýggjum hølum til frítíðarskúla og ungdómtilboð í Kaldbak hevur Býarskipanardeildin fingið málið til ummælis.

Ráðgevar hava gjørt uppskot, har bygningur til frítíðarskúla og ungdómstilboð er staðsettur vestanfyri skúlan og vøllin, og norðanfyri ætlaðu ítróttarhøllina, sí viðheftu *Støðumynd*.

Frítíðarskúlin, høllin, skúlin og vøllurin eru skipað kring eitt felags útiøki/torg, og verður henda skipanin av økinum mett at kunna vera við til at skapa eitt gott og trygt umhvørvi fyri børn og ung, mentan og ítrótt, miðskeiðis í bygdini, við møguleika fyri eini góðari samvirkan millum tey ymisku virksemini. Torgið, ið verður formað av bygningunum kring tað, kann virka sum eitt savningarstað fyri Kaldbaksfólk til ymisk tiltøk, t.d. jólatræshald.

Fyri at skipa økið so sum uppskotið vísir, er neyðugt, at kommunan ognar sær umleið 890 $m^2$ frá Búnaðarstovuni afturat tí, sum avtala longu er gjørd um. Um prísurin verður sammettur við prísin, kommunan keypti lendi til høllina í sama øki fyri, verður samlaði kostnaðurin áleið 200.000 kr fyri teir 890 $m^2$.

Harumframt má byggisamtyktin fyri Kaldbak broytast sambært uppskotinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at samtykkja:
- uppskotið til skipan av økinum smb. skjali *Støðumynd*.
- at broyta byggisamtyktina fyri økið smb. skjali *Eftir broyting.*
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendi.
- og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og mentamálanevndina.

**Ískoyti:**

Fyri at skipa økið so sum uppskotið vísir, er neyðugt, at kommunan ognar sær umleið 880 $m^2$ frá Búnaðarstovuni afturat tí, sum avtala longu er gjørd um.

Samlaður kostnaður til keyp av lendi frá Búnaðarstovuni og til avtalu við festara, er mettur til 200.000,- kr.

Viðmerkjast skal, at kommunan hevur biðið um eina tilsøgn frá Búnaðarstovuni, men hevur enn ikki fingið hesa tilsøgn.

Fyriliggjandi meting er út frá fermeturprísinum tá seinasta avtala var fingin í lag við Búnaðarstovu og festara.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa lendið uml. 880 m2, frá Búnaðarstovuni og endurgjald fyri ein samlaðan kostna á 200.000,- kr., at fíggja av konto 3175 Barnaansing LK31015 Tillagingar á dagstovnaøkinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt.

# 259/22 Fíggjarstøða Ítróttaanlegg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 14.09.2022 | 189/22 | 22/04673-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.10.2022 | 203/22 | 22/04673-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 246/22 | 22/04673-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 230/22 | 22/04673-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 259/22 | 22/04673-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarstøðan.

**Lýsing av málinum**
Rakstrarárið 2021 hevði Ítróttaanlegg eina samlaða meirnýtslu uppá tkr. 1.955, svarandi til 13%. Meginorsøk til stóra ósamsvarið er at finna í inntøkunum, sum vóru tkr. 1.105 ell 36% lægri enn fíggjarætlanin. Nógv tiltøk vóru avlýst vegna koronu, sum hevur ávirkað inntøkurnar. Í lønarjáttanini er eisini meirnýtsla uppá 27%.

Gongdin higartil í 2022 sær heldur frægari út serliga viðvíkjandi inntøkum, sum væntast at vera uml. tkr. 500 hægri enn í fjør. Framvegis er tó meirnýtsla í lønum og rakstri.

Nýggj leiðsla tekur við 1. oktober 2022.

Fíggjarstøðan verður munandi betrað, um rakstrarstaðið fær eykajáttan eitt nú svarandi til inntøkumissin í 2021, sum korona voldi, og har fíggjarstøðuna annars verður at fáa á beint frameftir. Mett verður tó, at best hevði verið at fingið alla meirnýtsluna burtur, so at ein meira haldfør fíggjarætlan liggur til grund fyri planleggingini av virkseminum komandi árini bæði hvat rakstri og skipan viðvíkur.

Á grein 5 løgukontu 5775 Ítróttaanlegg eru fleiri játtanir, sum ikki eru komnar í gongd og væntast heldur ikki at koma í gongd í 2022, og sum kundu fíggjað meirnýtsluna hjá stovninum. Sum uppskot kundi tað verið løgukarmur LK57042 Frælsur ítróttur tkr. 1.000, LK57041 Innandura spælipláss tkr. 1.000, ella LK57016 Golfvøllur.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Játtanarreglur.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | **Býráðsfundur**<br>24. november 2022 | Blað nr.: 993<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57041 og LK57042 | Innandura spælipláss kr. 1.000.000 Frælsur ítróttur kr. 1.000.000 | 5717 | | Ítrottaanlegg | | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg tkr. 1.000 av løgukarmi LK57042 Frælsur ítróttur og tkr. 1.000 av løgukarmi LK57041 Innandura spælipláss, tvs. tilsamans tkr. 2.000, til kontu 5717 Ítróttaanlegg sum eykajáttan.

**Mentamálanevndin 14. september 2022:** Útsett

**Ískoyti:**
Skotið verður upp, at eykajáttanartørvurin hjá stovninum Ítróttaanlegg tkr. 2.000 verður fíggjaður av løgukarmi 5775 Ítróttaanlegg LK57016 Golfvøllur á Glyvursnesi. Mett verður, at hetta ávirkar ikki ætlaðu arbeiðini viðvíkjandi golfvøllinum í 2023.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta tkr. 2.000 av løgukarmi 5775 Ítróttaanlegg LK57016 Golfvøllur til kontu 5717 Ítróttaanlegg sum eykajáttan.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ruth Vang var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmæl samtykt.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

| Býráðsfundur<br>24. november 2022 | Blað nr.: 995<br>Formansins merki: |
|---|---|

# 260/22 Fíggjarstøðan hjá Skúlanum á Fløtum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 20.09.2022 | 58/22 | 22/04616-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 220/22 | 22/04616-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 237/22 | 22/04616-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 260/22 | 22/04616-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarstøðan

**Lýsing av málinum**
Skúlin á Fløtum hevði við ársenda 2021 eina meirnýtslu uppá tkr. 2.240, svarandi til 20%. Lønarjáttanin hevur eina meirnýtslu uppá tkr. 712 (11%) og konta 14 keyp av vørum og tænastum hevur eina meirnýtslu uppá tkr. 1967 (40%).

2021 var fyrsta árið í nýggja skúlanum. Røð av viðurskiftum gera, at skúlin hevur ikki hildið játtanina og hevur borið útreiðslur antin vegna manglar í bygninginum, manglandi innbúgvi, manglandi húsavørði og ov lítið sett av til reingerð. Flytingin av 4-10 tilboðnum út á Argir gjørdist tkr. 500 dýrari enn játtaða fíggingin.

Fyri nógv av hesum er talan um eingangsútreiðslur. Men ein partur er eisini at fáa rætta uppá fíggjarætlanina, so hon svarar til veruligu útreiðslurnar, nú bygningurin og virksemi er komið í javna legu. Hetta er mest sjónligt í játtanini til reingerð, har staðfest er stórt ósamsvar við játtanina. Til fíggjarætlanina 2023 er játtanin í uppskoti hækkað við tkr. 836.

Skúlin sjálvur vil bera ymsar útreiðslur so sum tillagingar í bygninginum, bráðfeingis húsavørð v.m., men at kommunan letur eykajáttan til undirfíggingina av reingerð og reinførisvørum (tilsamans tkr. 800). Metast má rímiligt, at kommunan fíggjar meirkostnaðin at flyta 4-10 tilboðið (tkr. 500) og manglandi innbúgv (tkr. 400). Tilsamans tkr. 1.700.

Um so verður, metir skúlin at fáa meirnýtsluna burtur og raksturin verður sunnur í fíggjarárinum 2023.

Skúlin ger eisini vart við, at nýggja sáttmálan við NÁM um undirvísingartilfar er fíggjarliga ikki til fyrimunar fyri skúlan, tí hon er væl dýrari enn skipanin áðrenn, og skúlin ynskir at sleppa úr avtaluni. Talan er um sáttmála millum NÁM og Kommunufelagið, sum er bindandi fyri kommununa.

Á grein 4 og innan játtanir, sum trivnaðarnevndin varðar av, er ikki tøk játtan til hesa eykajáttan.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | Býráðsfundur<br>24. november 2022 | Blað nr.: 996 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | 4117 | | Skúlin á Fløtum | | 1.700.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at útvega Skúlanum á Fløtum konta 4117 eykajáttan tkr. 1.700.

**Trivnaðarnevndin 20. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á fíggjarnevndina at finna fígging.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og fíggja soleiðis,

L2375 LK23002 Tannlæknasstovan kr. 1.000.000
L5775 LK57033 Byrsumúli kr. 700.000

Annika Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 261/22 Flyting millum rakstrarstøð av játtan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 15.11.2022 | 18/22 | 22/06065-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 277/22 | 22/06065-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 261/22 | 22/06065-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 22/06065-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

Framflutta minninýtslan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni frá 2021 til 2022 var 8%. Nakað av peninginum var í framflytingini oyramerkt til onnur endamál á eldraøkinum, t.d. røkt, reingerðartænastuna o.a. Eisini var nakað oyramerkt til Naina og til rakstur av kommunulæknatænstuni.
5 nýggjar kommunulæknaviðtalur verða tiknar í nýtslu í Berjabrekku á sumri í 2023. Talan er um eina nýggja viðtalu og 4 verðandi viðtalur sum vera fluttar í nýggj hølir. Kommunan hevur skyldu at innrætta kommunulæknaviðtalur sambært Løgtingslóg um kommunulæknaskipan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 6. mai 2015.
Mett verður at tørvur er á 3.5 mio. kr. til at etablera 5 kommunulæknaviðtalur við innbúgv, tólum osv. Tó verður tað, sum er í verandi viðtalum, endurnýtt í tann mun tað ber til.
Møguligt er at fíggja etableringina av kommunulæknaviðtalum á 3.5 mio. av framfluttum peningini á stovnsnummar 2722 Tilboð.

Lágargarður er røktarheim við 48 búplássum. Lágargarður hevur virka í 35 ár og stórur tørvur er á at Lágargarður verður málaður innan. Møguligt er ikki hjá bygningsdeildini at gera hetta arbeiðið í ár. Heilsu- og umsorganartænastan hevur møguleika at nýta 700.000 kr. til hetta endamál av framfluttum peningi. Tí verður biði um at flyta 700.000 kr. av konto 2720 Heilsuhúsið til 6110 umsiting og røkt av bygningum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Heilsu- og umsorganarstjórin og fíggjarfulltrúin mæla Heilsu- og eldranevndini til:

- At flyta 3.5 mio. av 2722 Tilboð til 2210 Kommunulæknatænastur projekt 22001 til etablering av nýggjum kommunulæknaviðtalum í Berjabrekku.

- At flyta 700.000 kr. av 2720 Heilsuhúsið á 6110 umsiting og røkt av bygningum projekt 61112 til innduramáling av felagsøkjum á Lágargarði.

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 15. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 262/22 Sáttmáli um keyp av lendi matr. nr. 807a, KFUK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.11.2022 | 292/22 | 22/06702-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 262/22 | 22/06702-1 |

**Upprunin til málið**
Mál um at byggja skúlabygning til hádeild hjá Sankta Frans skúla, sí mál 22/00894 Hølisloysn til nýggja hádeild í Sankta Frans skúla.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at byggja skúlabygningin til hádeildn hjá Sankta Frans skúla á matr.nr. 807b, og í tí sambandi er neyðugt at fáa vegaatkomu til matr.nr. 807g, har ætlanin er at gera parkeringspláss til skúlan, og til 807b, har skúlabygningurin ætlandi verður bygdur.

Samráðst er við KFUK um avtalu og gjørt er uppskot tí viðvíkjandi, har kommunan keypir uml. 230m2 av lendi til veg burtur av matr.nr. 807a, sí tekning, og fær KFUK-húsið í hesum sambandi tinglýstan óskerdan atkomurætt eftir vegnum til KFUK-húsið, og nýtslurætt til nýggja parkeringsøkið, sum verður gjørt á matr.nr. 807g.

Ætlandi verða matrikklarnir, 807b, 807g og teir umleið 230 fermetrarnir, sum kommunan keypir burtur úr matr. nr. 807a, lagdir saman í ein matrikkul.

Sambært avtaluni er ætlanin, at P/F Fjarðhitafelagið leggur nýggja fjarðhitaleiðing til skúlan, og verður tá samstundis løgd fjarðhitaleiðing til KFUK-húsið, sum KFUK-húsið kann binda í sambært reglum hjá P/F Fjarhitafelagnum.

Haraftrat er ætlanin, at kommunan í sambandi við lendisarbeiðið til skúlabyggingina leggur um og dagførir kloakkina til KFUK-húsið, og ein farleið/rás verður gjørd frá nýggja parkeringsplássinum til brunatrappu á vestara enda á KFUK-húsinum.

Miðað verður eftir, at peningaligu viðurskiftini í mun til keyp og í mun til tey arbeiði, sum kommunan skal fremja sambært hesi avtalu, ganga upp peningaliga, og at peningaligu viðurskiftini verða avgreidd um somu tíð. Arbeiðið verður játtað av íløgufíggingini, sum ætlandi er tøk fra fíggjarætlanini 2023.

Sølan er treytað av, at Umhvørvisstovan gevur loyvi til nevnda frábýti.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. november 2022 | Blað nr.: 1001<br>Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at samtykkja uppskotið til avtalu við KFUK um keyp av lendi og fíggjað av íløguætlanini til byggiverkætlanina fyri 2023.

**Fíggjarnevndin 23. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. november 2022 | Blað nr.: 1002 |
| | | Formansins merki: |

## 263/22 Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 20/17 | 17/03196-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 227/17 | 17/03196-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 240/17 | 17/03196-1 |
| 4 Eldranevndin | 21.08.2018 | 4/18 | 17/03196-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 232/18 | 17/03196-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 3/19 | 17/03196-1 |
| 7 Eldranevndin | 14.02.2019 | 20/19 | 17/03196-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 50/19 | 17/03196-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 35/19 | 17/03196-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 110/19 | 17/03196-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 165/19 | 17/03196-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 232/19 | 17/03196-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 35/20 | 17/03196-1 |
| 14 Eldranevndin | 06.02.2020 | 31/20 | 17/03196-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 181/20 | 17/03196-1 |
| 16 Eldranevndin | 10.09.2020 | 12/20 | 17/03196-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 213/20 | 17/03196-1 |
| 18 Eldranevndin | 15.09.2020 | 15/20 | 17/03196-1 |
| 19 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 188/20 | 17/03196-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 146/21 | 17/03196-1 |
| 21 Heilsu- og eldranevndin | 14.09.2021 | 24/21 | 17/03196-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 217/21 | 17/03196-1 |
| 23 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 225/21 | 17/03196-1 |
| 24 Heilsu- og eldranevndin | 08.02.2022 | 3/22 | 17/03196-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 41/22 | 17/03196-1 |
| 26 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 37/22 | 17/03196-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 156/22 | 17/03196-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 180/22 | 17/03196-1 |
| 29 Heilsu- og eldranevndin | 15.11.2022 | 17/22 | 17/03196-1 |
| 30 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 279/22 | 17/03196-1 |
| 31 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 263/22 | 17/03196-1 |

**Málslýsing:**

Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýtt røktarheim umfrant atknýttar røktaríbúðum í høvuðsstaðarøkinum. Tilmælið verður nærri útgreinað niðanfyri.

Í lógini um heimatænastu, eldraøkt v.m. frá 2014 er í grein 13 ásett, at kommunur kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar eftir hesi lóg. Bústaðir kunnu sbrt. stk. 2 fevna um 1) røktarheim, 2) eldrasambýli, 3) eldraíbúðir, 4) umlættingarpláss og 5) samdøgursendurvenjingarpláss.

Viðmerkingarnar til lógina útgreina ikki hesar bústaðarloysnir nærri, ella hvussu tær skulu koma til vega. Ásetingin er ásannandi breiða politiska ynskið um, at bústaðarmarknaðurin eisini til eldri verður meira fjøltáttaður. Eftir stendur tó, at kommunur hava heimild og initiativ til at fáa til vega aðrar bústaðarloysnir enn røktarheim.

Tórshavnar kommuna hevur í dag 203 røktarbúpláss, harav eru 145 búpláss til røktarkrevjandi og 58 búpláss til fólk við demenssjúku. Harafturat eru 11 umlættingarpláss og 5 samdøgurs-rehabiliteringspláss.

Umleið 50 av teimum 145 búplássunum eru Ellisheim/sambýlispláss, sum eru roknað til lættari røktarkrevjandi umframt til onnur, sum eitt nú ikki kunnu búgva einsamøll.

Heilsu- og umsorganartænastan stendur fyri hesum búplássum, men hevur ikki onnur bústaðarsløg at bjóða.

Tá um hesi bústaðarsløg ræður, eins og í mun til onnur nýggj sløg, sum kommunan og heilsu- og umsorganartænastan í dag ikki kunnu bjóða, er týdningarmikið at hava greitt, hvat meint verður við, og til hvønn tørv hjá teimum eldru, ið loysnin er ætlað til. Hetta verður lýst nærri niðanfyri.

Búpláss:

- Búpláss til røktarkrevjandi á røktarheimi er ætlað eldri fólki, sum eru illa fyri, vanliga tí tey eru sjúk og tí hava tørv á at búgva á búplássi við røktarstarvsfólki um tey alt samdøgrið. Fast búpláss er síðsta loysnin, ið brúkt verður, sum fólk gerast verri fyri. Røktarheimini hýsa borgarum, sum krevja røkt og hjáveru alt samdøgrið.

- Ellisheimið og sambýlini hýsa borgarum, sum eru lættari røktarkrevjandi og/ella sum ikki kunnu búgva einsamøll. Tvs., at húsfólk á Ellisheiminum og sambýlinum eru betur fyri, tá tey flyta inn enn tey, sum flyta inn á røktarheim at búgva.

- Eisini demensbúpláss eru røktarbúpláss, har røktarstarvsfólk eru til staðar alt samdøgrið, men hesi búpláss eru á stovnum ella deildum, sum einans eru ætlað eldri fólki við demenssjúku. Fólk við demenssjúku hava aðrar avbjóðingar enn eldri fólk við øðrum røktarkrevjandi sjúkum, og tí tørvar teimum at sleppa á búpláss, sum serliga eru ætlað fólki við demenssjúku.

Íbúðir:

Við støði í lógarásetingini, sum nevnd er omanfyri, so eru eldraíbúðir eisini bústaðarloysn, ið kommunur kunnu stovna. Ymiskt kann leggjast í fatan av, hvat ein eldaríbúð er, tí talan er um felagsheiti fyri ymsar bústaðarloysnir.

Niðanfyri verður felagsheitið eldraíbúð brotið upp í tvær ymiskar bústaðarloysnir – røktaríbúð og eldravinarliga íbúðir. Hesar kunnu aftur býtast sundur alt eftir, hvørt talan eru leiguíbúð ella eigaraíbúð.

Felags fyri allar eldraíbúðir er tó, at tær skulu vera innrættaðar hóskandi við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og rúmligum baðirúmi, so tað er pláss fyri koyristóli og hjálparfólki. Íbúðirnar skulu ikki hava trappu til høvuðsinngond, og um íbúðin er ikki í veghædd, skal lyft vera til íbúðina.

Eitt annað, ið eisini er øðrvísi við eldraíbúðum í mun til búpláss á røktarheimi er, at í íbúðunum kunnu búgva hjún/sambúgvandi.

- Røktaríbúð vil vanliga vera næstsíðsti bústaðurin, áðrenn upptøku til fast røktarheimspláss. Hetta vilja vera borgarar, sum heimatænastan hevur veitt tænastur til, men har mett verður, at borgarin og evt. saman við makanum høvdu fingið betri umstøður við at flyta í røktaríbúð, har røktarstarvsfólk eisini er knýtt at alt samdøgrið. Málbólkurin vildi eisini verið borgarar, sum í dag vera visiteraðir til ellisheim/sambýli.

  Røktaríbúðir kunnu við tí størsta fyrimuni byggjast saman við einum røktarheimi, har borgarin fær ágóða av øllum felagsfasilitetunum eitt nú venjingarumstøðum og trivnaðartilboðum annars. Eru røktaríbúðir knýttar at røktarheimi, verða tað starvsfólk á røktarheiminum, sum veita ta heimatænastu, ið borgarin annars vildi fingið sum heimabúgvandi. Hetta lættir sostatt um hjá heimatænastuni, men krevur ávísa tillaging av røktarnormeringini á heiminum.

  Kommunan hevur heimild byggja og reka røktaríbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónina um hendi. Til ber tó eisini, at aðrir partar byggja og reka røktarleiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu hevur visitatiónsrætt til allar røktaríbúðirnar.

- Eldravinarliga íbúð er íbúð, sum er innrættað hóskandi sum omanfyri lýst við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og bað o.s.fr. Onnur krøv eru sum so ikki, og íbúðin kann eins væl nýtast av øðrum yngri borgarum.

  Eldravinarlig íbúð kann tí byggjast sum einstakar íbúðir í størri íbúðarbygningi ella sum eldraíbúðardepil, tvs. nógvar eldravinarligar íbúðir í sama kompleksi. Alt eftir, hvussu nógvar eldravinarligar íbúðir vildi verið í slíkum kompleksi, har tað eisini mest sannlíkt er ávíst tal av borgarum, sum hava tørv á heimatænatuni, kundi hølisumstøður til heimatænastu verið knýttar at staðnum.

  Kommunan hevur heimild at byggja og reka eldravinarligar íbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónsrætt. Til ber tó eisini, at aðrir partar, t.d. Bústaðir ella íleggjarar, byggja og reka eldravinarliga leiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu eisini hevur visitatiónsrætt til nakrar ella allar teirra.

  Har tað í mun til røktaríbúðir vilja verða borgarar, sum frammanundan fáa heimatænastu og aðrar tænastur frá heilsu- og umsorganartænastuni, ið verða visiterað til røktaríbúð, so nýtist ikki sama at verða galdandi fyri eldravinarligu íbúðirnar. Talið av pensjónistum økist í stórum, og nógv av hesum eru vegna góða heilsustøðu als ikki í skipanini hjá heilsu- og umsorganartænastuni.

  Skal heilsu- og umsorganartænastan visiterað til eldravinarligar íbúðir, má gerast ein skipan, har ávís metingarkriteriu eru ásett, eisini fyri at ikki at hava fleiri bíðilistar til somu íbúðir (at fólk skriva seg upp bæði hjá kommununi og t.d. Bústøðum).

Út frá omanfyri standandi verður mett skilabest í mun til tey bútilboð, ið heilsu- og umsorganartænastan skal veita, at røktaríbúðir og røktarheim verða bygd í somu bygging ella beint upp at.

Røktaríbúðir er í føroyskum samanhangi nýtt konsept, ið skal mennast, eitt nú í mun til samstarv við aðrar áhugapartar – eitt nú Bústaðir, byggivinnuna, fíggjarstovnar v.m. Røktaríbúðirnar, hóast bygdar saman við ella upp at einum røktarheimi, eru leiguíbúðir, og kunnu tí byggjast og umsitast við støði í tí, men har kommunan tryggjar sær fullan visitatiónsrætt.

Júst hvussu hetta kann gerast ella hvørjir samstarvshættir eru møguligir, eigur henda verkætlanartilgongdin at koma til niðurstøðu um.

Í virkisætlanini er víst á ein endurnýggjanartørv, tvs. antin dagføra ella niðurleggja verandi ótíðarhóskandi pláss. Víst er eitt nú á Ellisheimið, sum krevur umfevnandi dagføringar, ið illa loysa seg fíggjarliga. Verkætlanartilgongdin eigur eisini at fyrihalda seg til henda spurning m.a. við atliti at, hvussu hesi 27 búplássini kunnu endurnýggjast møguliga sum eitt lutfall millum føst røktarbúpláss og røktaríbúðir aftrat tí tørvi, sum røktarheimið annars skal røkka.

Í sambandi við bygging av nýggjum røktarheimi skal vælferðartøkni og snildtøkni (samskiftisútgerð, trygdar- og ávaringarskipanir) integrerast.

Til tess at seta hol á bygging av nýtt røktarheim, verður mett skilabest at seta bygginevnd við støði í mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur tveir nevndarlimir og borgarstjórin tilnevndi eitt umboð fyri ávikavist teknisku fyrisiting, miðfyrisitingin og trivnaðarfyrisitingina.

Bygginevndin skal sum tað fyrsta útvega byggiskrá og definera byggingina nærri í mun til støddir, luftfall røktarbúpláss, harundir eisini demensbúpláss, og røktaríbúðir, eins og at bygginevndin saman við politisku skipanini annars mennir ein samstarvshátt við aðrar áhugapartar í sambandi við bygging og umsiting av røktaríbúðum.

Til endamálið er neyðugt við játtan til fyrireikingar, ráðgeving v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at seta bygginevnd til sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi játta kr. 1 mió til fyrireikingar, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.

**Eldranevndin 02. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og at velja Bjørghild Djurhuus og Bergunn Kass í bygginevndina.

**Ískoyti:**
26 okt. 2017 samtykti býráðið at seta bygginevnd sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi at játta kr. 1. mió til fyrireiking, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.
Bygginevnd bleiv sett fyrst í hesum árinum og hevur havt tveir fundir. Bygginevndin metir, at arbeiðssetningurin er ikki nóg neyvur og ynskir tí at fáa ein greiðari arbeiðssetning, áðrenn nevndin kann fara víðari við arbeiðinum. Serliga verður hugsað um at fáa nágreinað, hvussu nógv húsfólk røktarheimið skal byggjast til.

Sambært nýggjastu framrokningunum hjá Hagstovuni verður mett, at tað vera 1.124 fólk eldri enn 80+ ár í Tórshavnar kommunu í 2025. Í 2018 er hetta tal 811 fólk. Fyri at nøkta vaksandi tørvin á røktarheimsplássum til ta tíð, er neyðugt at økja um búplássini.

Umframt at byggja til vaksandi tørv á búplássum, er – sum lýst í virkisætlanini (j.nr. 17/00586) og málslýsingini frammanfyri- ætlanin, at nýggja røktarheimsbyggingin skal vera við til at endurnýggja verandi pláss, sum eru ótíðarhóskandi, fyrst og fremst Ellisheimið.

Sum kunnugt verður umbyggingin av Tjarnargarði í løtuni projekterað, har pláss verður fyri 7 nýggjum umlættingarplássum til fólk við demenssjúku – arbeiðið verður eftir ætlan boðið út um stutta tíð. Harafturat verður umlættingar- og rehabiliteringsdepil við 28 plássum fyrireikaður. Tá hesar ætlanir eru komnar á mál, verða 9 av verandi plássum umløgd til føst bupláss.

Umframt omanfyri nevndu átøk, so verður mett neyðugt, at nýggja røktarheimið hevur 48 búpláss, t.e. tríggjar deildir við 16 húsfólkum á hvørjari deild eins og Lágargarður, umframt 8 røktaríbúðir. Hetta gevur í alt 56 pláss. Av hesum 56 plássum er ætlanin, at 25 av hesum er endurnýggjan av plássunum á Ellisheiminum, ið soleiðis kann niðurleggjast sum ellisheim.

Hesar ætlarnir tilsamans geva í 2025 eitt dekningsstig á 26,5% , sí talvu niðanfyri, og sum er eitt vet hægri enn dekningsstigið í dag.

| TÓRSHAVNAR KOMMUNA | | År 2000 | | År 2010 | | År 2019 | | År 2020 | | År 2025 | | År 2030 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkatal, 80+ ár | 457 | | 669 | | 850 | | 906 | | 1.124 | | 1.415 | |
| **Pláss/Fólkatal 80+ ár (dekningsstig)** | | | | | | | | | | | | |
| **Pláss/Dekningsstig** | 97 | 21,2% | 155 | 23,2% | 222 | 26,1% | 251 | 27,7% | 298 | 26,5% | 298 | 21,1% |
| *har av røktarbúpláss* | 87 | 19,0% | 145 | 21,7% | 204 | 24,0% | 213 | 23,5% | 252 | 22,4% | 252 | 17,8% |
| *har av stutttíðarpláss* | 10 | 2,2% | 10 | 1,5% | 18 | 2,1% | 38 | 4,2% | 38 | 3,4% | 38 | 2,7% |
| *har av røktaríbúðir* | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 8 | 0,7% | 8 | 0,6% |

**Fólkatalsframrokning 80+ ár pr. 06.06.2018, hagstovan.fo*

**íroknað nýggjum Umlættingar- og rehabiliteringsdepli og útbyggingini av Tjarnargarði til demensdepil*

*Nýtt røktarheimi + endurnýggja plássini á Ellis-heiminum.*
*(+) 48 (-) 25 = 23 nýggj*
*(+) røktaríbúðir = 8 stk.*
*(+) eina lon afturat á 16 stk.*

Eitt nýtt røktarheim við 48 búplássum og 8 røktaríbúðum verður mett at vera skilagóð støðd, eisini sum rakstrareind. Búeindir á 16, sum ofta verður koyrt í 2, tvs. 8 og 8 á somu eind er eisini skilagóð støðd í mun til at fólk búgva saman.

Mett verður harafturat skilabest, at staðseting og byggingin er soleiðis háttað, at til ber at byggja røktarheimið út seinni.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og eindarleiðararnir í H og U mæla til at samtykkja fylgjandi arbeiðssetning fyri ætlanina:

At fáa til vega byggiskrá fyri bygging av nýggjum røktarheimi við 48 búplássum og 8 atknýttum røktaríbúðum, at staðsetingin og byggingin kann skipast soleiðis at tað lættliga ber til at útbyggja røktarheimið við einari ella tveimum deildum eftir tørvi.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og staðsetingina í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at mæla býráðnum til at broyta byggiskránna fyri bygging av nýggjum røktarheimi til at fevna um 64 búpláss og 16 røktaríbúðir og at beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina viðvíkjandi staðseting.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggiverkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður mett, at tørvur er á einum bygningi samsvarandi 6600 $m^2$ í byggistigi. Her er sum heild talan um ein bygning í tveimum hæddum, sum tó verður tilevnaður eftir tørvi og ynskjum, sniðgeving, innrætting og ikki minst hvussu bygningurin verður staðsettur í landslagnum. Tørvur er tískil á einum øki á í minsta lagi 11.000 $m^2$. Og verður hugsað um møguligar framtíðar útbyggingar, er talan um eitt samsvarandi størri øki.

Umsitingin hevur umrøtt spurningin um øki til eitt nýtt røktarheim við røktaríbúðum í tráð við býarplanleggingina, og vísir umsitingin á eitt øki úti í Marknagili í Tórshavn, sí kortskjalið "*Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort*".

Um hugt verður eftir Marknagili sum býarparti, so er økið nógv broytt seinastu tíðina við stórum byggiverkætlanum, sum somuleiðis skapa nógv virksemi í økinum. Sambært kommunuætlanini er Marknagil ein býarpartsdepil, har býarvøkstur verður skipaður við at miðsavna ymiskt virksemi á einum stað. Í býarpartsdeplinum skal fram um alt vera virksemi sum handlar við gerandisvørum, stovnar, skúlar, útbúgving, býlingshús og mentanarligt virksemi.

Økið, sum umsitingin vísir á, er partur av ávegis heildarætlanini fyri økið við og omanfyri býlingin undir Fjalli. Skipanaruppskotið í heildarætlanini fevnir um infrakervi, bústaðarbygging og almennar stovnar, og er økið millum Dánjalstrøð og íbúðarbyggingina MARK lagt út til stovnsbygging. Eitt ellisheim hóskar væl inn í býarskipanina í økinum, og hóast økið liggur upp at einum høvuðsvegi, so verður bygt burtur frá ferðsluni í sera náttúruvøkrum umhvørvi, har byggingin somuleiðis tekur atlit til verandi lendið.

Í sambandi við skipanaruppskotið skal infrakervið í økinum víðkast. Dánjalstrøð gerst høvuðsvegur til nýggja útstykking, og í sambandi við eitt nýtt ellisheim er neyðugt at gera fyrsta strekkið av vegnum, sum er áleið 220 metrar. Ein yvirskipaður kostnaður er kr. 25.000 + mvg pr./m.

Økið er partur av Húsahaga, matr. 1160a, umframt matriklunum 1172a og 1176. Eitt hóskandi øki skal frámatrikulerast til endamálið, og er neyðugt við eini marknaumskipan, sum verður send Umhvørvisstovuni til avgreiðslu.

Økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum eru øki ætlað til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál, umframt stórum almennum stovnum til umsiting, skúlaskap og heilsurøkt. Neyðugt er sostatt at broyta almennu byggisamtyktini til endamálið, umframt at serstøk byggisamtykt skal gerast fyri nýggju útstykkingina.

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
Skipan av økinum oman fyri Marknagilsvegin og undir Fjalli, journal nr. 18/01811.

**Skjøl:**
Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort, journal nr. 17/03196-15

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til prinsipielt at góðkenna staðsetingina, at umsitingin arbeiðir víðari við staðsetingini og myndugleikaviðgerð, at beina málið í eldranevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bjørg Dam, mælir til at finna aðra staðseting nærri sjónum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Eldranevndin 14. februar 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá borgarstjóranum um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanina at staðseta nýtt røktarheim og gera nýggja vegaføring úti í Marknagili, hevur eigarafelagið á Dánjalstrøð sent kommununi mótmæli, har sjónarmiðini í høvuðsheitum eru:

- at neyðugt er at broyta byggisamtyktina til endamálið, tí økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Í hesum sambandi verður harðliga mælt ímóti, at býráðið ætlar at strika økið sum D1 øki, tí tey seinastu 30 árini hava tey innrættað seg eftir, at økið er lagt út til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál.
- at eigarafelagið í áravís hevur mótmælt, at ein av mest trafikeraðu vegum í landinum verður lagdur 2-3 metrar frá sethúsabyggingini á trøðni. At leggja ein somikið trafikeraðan veg á hetta D1 økið er so langt burtur frá hesum endamáli, sum til ber at hugsa sær, sí annars mótmælið.

Yvirskipaða ætlanin fyri økið undir Fjalli er samtykt, og verður mett, at staðsetingin til eitt nýtt røktarheim hóskar seg væl í hesum náttúruvakra økinum. Tá tosað verður um býarskipan, typologi og staðsetingar av hesum, verður í dag stórur dentur lagdur á at staðseta heim til eldri í einum nærumhvørvi við nógvum aktiviteti. Her verður serliga hugsað um dagstovnar, skúlar, handil við gerandisvørum eins og bústaðir. Ynski hevur verið frammi um at staðseta eitt røktarheim nærri sjónum, har dentur verður lagdur á eina hugsan um friðsælu. Í veruleikanum verður eitt heim nærri sjónum meiri avbyrgt, bæði í mun til ta fysisku planleggingina og nærveruna í sambandi við gerandislívið. Granskað hevur somuleiðis verið í einsemi hjá búfólki, og vísir granskingin, at nærveran við onnur menniskju hevur sera stóran týdning.

Talan er framvegis um eitt D1 øki, sum framhaldandi verður fríøki, fyri uttan tað økið, sum verður lagt av til sjálvt røktarheimið. Økið, har røktarheimið verður staðsett, verður í tilgongdini broytt til ásetingina D3, sum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er lagt av til miðstaendamál, umframt skúlar, almennar stovnar og íbúðir.

Arbeitt hevur verið við nýggju vegaføringini, sum er ein liður í eini størri ætlan fyri infrakervið kring Havnina. Leingi hevur ligið í kortunum og tað er somuleiðis av stórum týdningi og neyðugt, at eitt vegasamband millum komandi innkomuveg og Marknagil verður gjørt gjøgnum hetta grøna økið. Her er talan um ein kommunalan veg, og er ætlanin, at niðasti parturin av vegnum verður fyrsta stigið í ætlanini, sum somuleiðis verður atkomuvegur til nýggja røktarheimið. Vegurin verður í størst møguligan mun fluttur yvir ímóti grøna økinum fyri at skapa rúm ímillum veg og verandi bygging, og verða harumframt báðar áirnar varðveittar, sum tær eru í dag. Eftir ætlan leggur vegurin seg niður í lendið, og kemur hann soleiðis ikki at

ávirka røktarheimið nakað serligt, umframt at tað verður møguligt at planta á økinum millum veg og útstykkingina, sum eigarafelagið umboðar.

Fyri røktarheims verkætlanina er tað av stórum týdningi, at staðsetingin fyri røktarheimið verður staðfest og samtykt, soleiðis at fyrireikingararbeiðið kann halda áfram. Somuleiðis skal kunnast um, at verður neyðugt at finna aðra staðseting og um hetta dregur út, so kemur hetta at ávirka upprunaligu tíðarætlanina fyri bygging av røktarheiminum. Mælt verður tískil til, at støða verður tikin til um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið.

**Skjøl:**
Eigarafelagið á Dánjalstrøð - mótmæli, journal nr. 17/03196-24.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at nevndin tekur støðu til, um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið, og um verandi staðseting verður samtykt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at halda fast við verandi staðseting og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, beinir málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at viðgera staðseting og vegatkomu.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt nýtt uppskot til staðseting av byggingini, soleiðis at byggingin verður flutt út í D3 øki, sum í mun til byggisamtyktina er lagt út til almennar stovnar.
Staðsetingin er tillagað vegaprosjekt, sum fyriliggja sum fyribils ætlanir. Tillagingar kunnu koma fyri, og má roknast við at tað verða tillagingar í mun til endaliga verkætlan.
Byggjast skulu uml. 6600 fermetrar, og er tørvur á einum byggiøki á 11000 fermetrar.
Íbindingarvegurin verður umskipaður, og vegaprosjekt skal gerast ísv. fyrireikingar av Røktarheiminum, soleiðis at linjuføringin er so skynsom sum til ber.

**Skjøl:**
17-031196-29 uppskot til staðseting januar 2020

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at tikið verður undir við uppskotinum til staðseting í D3 økinum
- at skipanaruppskot verður gjørt fyri økið,við vegalinjum og byggiøkjum.
- at farið verður undir lýsa hvussu vit skulu byggja røktarheim í framtíðini.
- at ein byggiskrá til nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður gjørd.
- at upp til kr. 700.000 verða játtaðar til omanfyri nevnda arbeiði.

Umframt at beina málið í eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Eldranevndin 06. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**

Hugt hevur verið eftir nýggjum staðsetingum til at byggja nýtt røktarheim og røktaríbúðir í Tórshavn, Hoyvík og Argjum. Tørvur er á einum øki á uml. 20.000 $m^2$ til at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Harafturat skal øki leggjast av til møguliga víðkan/útbygging av røktarheiminum og møguliga fleiri røktaríbúðum. Enn er óvist hvussu stórur tørvurin er á til víðkan/útbygging, men skal hetta nágreinast nærri í tilgongdini.

Høvuðsstaðurin er vaksin nógv, og torført er at finna hóskandi stór økir til endamálið. Neyðugt er tí at hyggja eftir økjum í útjaðaranum á býnum, sum eru partur av býartættingini og býarvakstrarøkjum, umframt teimum møguleikum, sum liggja inni í býnum.

Økið við Stórutjørn er sambært Kommunuætlanini fyrsta býarvakstrarøki, sum skal skipast til ein nýggjan býling í Tórshavn. Hoyvíkin er vaksin nógv seinastu árini, og við mongu íbúgvunum hevði eisini verið hóskandi at bygt eitt nýtt røktarheim í Hoyvík, tí einki er í økinum í dag. Kirkjugarður er skipaður í økinum, og við teimum alsamt fleiri vaksandi hentleikunum, hevði eisini ligið væl fyri at skipað bústaðir til eldru borgararnar í økinum.

Arkitektakapping var í vár um skipan av Stórutjørn, og skal endaliga skipanin og projekteringin setast í verk so skjótt játtan er tøk til hetta. Tá arbeiðið verður raðfest, eigur eitt hóskandi øki at verða sett av til nýtt røktarheim við røktaríbúðum.

Skjal nr. 17/03196-33 lýsir Stórutjørn og hvat krevst fyri at fara inn á økið við einum røktarheimi.

**Skjøl:**
Staðseting_Stóratjørn, journal nr. 17/03196-33

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, Heilsu- og umsorganarstjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á økinum við Stórutjørn, at bygginevndin arbeiðir víðari við at nágreina tørvin á røktarheiminum og møguligum tilhoyrandi útbyggingum, og beina málið í býráðið umvegis eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Eldranevndin 10. september 2020:** Útsett.

**Eldranevndin 15. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Eldranevndini og meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, mælir til at finna aðra hóskandi staðseting nærri miðøkinum.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin at skipa økið á Stórutjørn er farin av bakkastokki, men er talan um ein longri tíðarkarm, áðrenn nøkur ítøkilig ætlan kann skipast á økinum. Fyri at koma í gongd við verkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum er neyðugt at finna endaligu staðsetingina, og tí hevur verið hugt eftir møguligum øðrum staðsetingum til verkætlanina.

Økið eystan fyri Dalin Langa í Hoyvík varð í kommunuætlanini frá 2014 lagt út sum møguligt býarvakstrarøki í Hoyvík. Økið, sum verður nevnt Stórabrekka, liggur á eini høvd oman fyri vinnuøkið við Vegin Langa í 100 m hædd við stórslignum útsýni móti norðuri, eystri og suðri. Økið er óslætt heyggjalendi og liggur somuleiðis út til Dalin Langa, sum er eitt rekreativt øki við gongu/súkklubreyt og uppihaldsøki við Myllutjørn. Henda staðsetingin hevur áður verið nevnd í sambandi við at byggja nýtt røktarheim, men gjørdist hetta ikki aktuelt, tí ynski var at byggja bústaðir á Stórubrekku. Henda ætlanin er nú slept, og verður tí mælt til at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á Stórubrekku.

Á Stórubrekku eru umleið 35.000 $m^2$ av lendi, sum byggjast kann á. Tørvur er á einum stórum øki til verkætlanina, umframt at øki skal leggjast av til møguliga víðkan. Stórabrekka liggur innan fyri Klingruna, og er tí longu ein partur av bygda økinum, mótsett Stórutjørn sum fer at liggja sum byggiøki í eitt tíðarskeið, meðan bygt verður. Økið er stórt, og eru góðir møguleikar at byggja lutvíst í einari hædd, sum ynski er um, og at víðka um byggingina seinni, um tørvur er á tí.

Økið liggur millum Dalin Langa og stóra vinnuøkið, sum hevur grivið seg inn undir landslagið. Hetta inntriv, sum er gjørt í lendið í vinnuøkinum, er sera ógvusligt og eirindaleyst sprongt burtur, fyri at fáa fleiri fermetrar til goymslur v.m. Ein trygdargeiri áljóðandi 30 metrar er lagdur parallelt við kantin, og kann ikki byggjast á hesum strekkinum, men kann hetta teljast við í byggistigið.

Vegasamband er frá Klingruni, og lætt er at skipa gøtur og fríøki í økinum, sum kunnu gerast partur av gøtukervinum til Dalin Langa og grøna nærumhvørvið. Góður sólargangur og gott útsýni er til allar síður frá Stórubrekku, tí økið liggur høgt og skránar til allar síður. Lívd er ikki nógv av í verandi støðu, men við skilagóðari skipan av bygging, fríøki, vøkstri, parkering og atkomum við gøtusambondum, kann lívd fáast til uppihald og gróðursett øki.

Stórabrekka liggur sum framhald av rehabiliterings- og umlættingardeplinum URD, og kann eitt nýtt røktarheim samvirka við stovnin og uttanumøki, sum somuleiðis verður lýst í ritgerðini "Eitt evidensgrundað designuppskot fyri Dalin Langa, Hoyvík, við denti á endurvenjing og at skapa sálarliga heilsubót fyri brúkararnar á umlættingar- og rehabiliteringsdeplinum URD". Í stuttum fevnir uppskotið um sambandi millum endurvenjing og ágóðan av at vera í náttúruni sæð út frá einum sjónarmiði at menniskju liva alsamt longri.

Økið, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, er fevnt av umráðispartinum A3 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðarbygging. Eitt nýtt røktarheim rúmast ikki innanfyri ásetingarnar, og er neyðugt at broyta almennu byggisamtyktina til umráðispart D3, sum verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt. Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt, og skal nýggj serstøk byggisamtykt tí gerast sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini. Økið á Stórubrekku er partur av matr. nr. 138a, og skal eitt hóskandi øki tí sundurbýtast til endamálið.

Skjøl:

- Stórabrekka - Staðseting (kortskjal), journal nr. 17/03196-34.
- Eitt evidensgrundað designuppskot fyri Dalin Langa, Hoyvík, við denti á endurvenjing og at skapa sálarliga heilsubót fyri brúkararnar á umlættingar- og rehabiliteringsdeplinum URD, journal nr. 17/03196-33.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, heilsu- og umsorganarstjórin og býararkitekturin mæla til:

- at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á økinum á Stórubrekku
- at broyta almennu byggisamtyktina og gera nýggja serstaka byggisamtykt
- at bygginevndin arbeiðir víðari við at nágreina tørvin á røktarheiminum
- og beina málið í býráðið umvegis heilsu- og eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen og Ruth Vang, samtykti at taka undir við staðsetingini av røktarheiminum og røktaríbúðunum á Stórubrekku í Hoyvík og beina málið í býráðið umvegis heilsu- og eldranevndina og fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Ískoyti**:
Framtíðar røktarheimsbygging – námsferð.

Býráðið hevur samtykt at byggja nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 atknýttum røktaríbúðum.

Fyrireikandi arbeiðið er farið í gongd. Hetta er stór verkætlan, og sum støðan er við vaksandi tali av eldri borgarum og minkandi arbeiðsmegi, er neyðugt at hugsa nýtt, tá bygt verður. Neyðugt er at tryggja, at eitt nýtt røktarheim er soleiðis bygt og útgjørt at tað í størst møguligan mun tekur atlit til hesa avbjóðing. Í hesum sambandi er neyðugt at eisini vælferðartøknin er hugsað inn í loysnirnar á heiminum.

Ráðstevna um fremtidens boligbyggeri verður í Keypmannahavn 17.-18. november 2021.

https://nohrcon.dk/produkt/temauge-om-byggeri-og-indretning-af-pleje-og-seniorboliger-2021/kobenhavn-2021-11-16/

Tað er Nohrcon www.nohrcon.dk sum skipar fyri ráðstevnuni. Skráin fyri dagarnar er viðfest. Prísur og avsláttur framgongur av heimasíðuni.

Ætlanin er at bygginevndin og eldranevndin saman við viðkomandi fólki frá umsitingini fara til hesa ráðstevnu at kunna seg um og fáa inspiratión til bygging av nýggjum røktarheimi og røktaríbúðum.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúi í heilsu- og umsorganarfyrisitingini mæla til at heilsu- og eldranevndin umframt Ruth Vang, limur í bygginevndini fara á ráðstevnu í Keypmannahavn um fremtidens plejehjemsbyggeri og leggja málið fyri fíggjarnevndina til samtyktar.

**Heilsu- og eldranevndin 14. september 2021:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk, Kári Johansen og Birgir Nielsen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini um staðseting.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

Nevndin tekur eisini undir við tilmælinum um at heilsu- og eldranevndin umframt Ruth Vang, limur í bygginevndini fara á ráðstevnu í Keypmannahavn um fremtidens plejehjemsbyggeri og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og meirilutanum í Heilsu- og eldranevndini.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er byrjað at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum. Býarskipanardeildin hjá Tórshavnar kommunu stendur fyri hesum arbeiðinum at gera byggiskránna.

Byggiskráin verður eftir ætlan liðug í medio 2022. Og verkætlanin skal eftir ætlan bjóðast út hareftir - ultimo 2022. Bygginevndin hevur tikið støðu til at bjóða arbeiðstøkuna út í høvuðsarbeiðstøku. Grundgevingin er í høvuðsheitum, at verkætlanin er sera stór í vavi. Tað er avbjóðandi at byggja bæði røktarheim og eisini íbúðir í einum samlaðum prosjekti. Ætlanin er at bjóða ráðgevaraarbeiðið út skjótast til ber. Bygginevndin metir, at tað er lættari og betri at tillaga prosjektið sum longst í eini tilgongd saman við vinnandi ráðgevaratoymi - til tess at fáa eina so góða verkætlan sum gjørligt.

Ynski er eisini at leggja dent á vælferðatøkni sum heild í røkt í Tórshavnar kommunu. Vælferðatøkni er nógv frammi í verkætlanum í Norðurlondum. Umsitingin er í gongd at gera fáa lýst krøv til vælferðatøkni í byggiskránni, soleiðis at hetta verður knýtt í hesa verkætlan.

Fígging:
Samanlagt eru 10 mió tøkar av løgukarmi konto 2775 eldrarøkt til uppstart, forkanningar, ráðgeving, fyrireiking til útbjóðing av verkætlanini.

- Játtaðar eru 4 mió. av karminum fyri 2021
- Játtaðar eru 6 mió. av karminum fyri 2022

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- At játta kr. 4 mió. av karminum fyri 2021, konto 2775, LK27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum
- At játta kr. 6 mió. av karminum fyri 2022, konto 2775, LK27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum
- Flyta peningin áljóðandi samanlagt 10 mió. á konto 2775 eldrarøkt(íløgur), L27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum.
- Geva umsitingini heimild at bjóða verkætlanina út eftir leisti og útbjóðingarhátti, sum bygginevndin mælir til.
- Geva umsitingini heimild at fara undir sáttmálasamráðingar við vinnandi ráðgevarafyritøku.

  Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 08. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at støða verður tikin til leist og útbjóðingarhátt, tá ið byggiskráin er liðug.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er í gongd at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum. Neyðugt er at taka støðu til, hvør útbjóðingarháttur skal vera, tí m.a. skulu kappingartreytir og útbjóðingarháttur lýsast í byggiskránni.

Tilmælið er at bjóða arbeiðstøkuna út í høvuðsarbeiðstøku. Grundgevingin er í høvuðsheitum, at verkætlanin er sera stór í vavi. Tað er avbjóðandi at byggja bæði røktarheim og eisini íbúðir í einum samlaðum prosjekti. Ætlanin er at bjóða ráðgevaraarbeiðið út skjótast til ber. Mett er at tað er betri fyri verkætlanina at tillaga prosjektið sum longst í eini tilgongd saman við vinnandi ráðgevaratoymi - til tess at fáa eina so góða verkætlan sum gjørligt.

**Tilmæli:**

Bygginevndin mælir til at bjóða verkætlanina út eftir leisti og útbjóðingarhátti sum lýst omanfyri.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Útsett við atliti til at lýsa ymisku útbjóðingarhættirnar.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Teldupostur sendur limunum í fíggjarnevndini 23. juni 2022: kann fíggjarnevndin taka undir við tilmælinum frá bygginevndini um at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu?

**Fíggjarnevndin samtykt við telduposti 27. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum er liðugt. Byggiskráin er endaliga granskað og er nú klár at bjóða út. Býarskipanardeildin hjá Tórshavnar kommunu hevur staðið fyri hesum arbeiði at gera byggiskránna.

Verkætlanin varð boðin út til undangóðkenning tann 5. septembur 2022 fyri ráðgevaratoymi. 7 Ráðgevaratoymi hava boðið inn. Høvuðsráðgevararnir í hvør sínum toymi vóru hesir:

ARKITEKTAR 99 / BIG
EYA/CUBO
KONTRAST
MAP
OSBJØRN JACOBSEN / HENNING LARSEN
SNA
ZETA/BRIM

Út frá eini heildarmeting hevur bygginevndin valt at fara víðari við fýra ráðgevaratoymum, sum vóru útvald og grundað á meting av førleikunum hjá umsøkjarunum, hvussu viðkomandi framsendu tilvísingarnar vóru. Tey valdu ráðgevaratoymini eru:

EYA/CUBO
HENNING LARSEN NA
MAP
SNA

Eftir ætlan verður lidna byggiskrá og tilhoyrandi útbjóðingartilfar sent út í hugskots/prosjektkapping í desembur 2022 til omanfyristandandi fýra ráðgevaratoymi, sum skulu lata sítt tilboð inn eftir ætlan í marts 2023.
Fyri tey tilboð, sum lúka treytirnar (eru kondisjónsmessig), men sum ikki vinna útboðið, verður latin samsýning á 350.000,- kr. Peningur er tøkur til endamálið.
Vinnarin fær í boði at skriva sáttmála við Tórshavnar kommunu um uppgávuna. Uppgávan umfatar heildarráðgeving í sambandi við gerð av skipanaruppskoti, verkætlanaruppskoti, forprosjekti, høvuðsprosjekti, útboði í høvuðsarbeiðstøku, umframt uppfylging og eftirlit í sambandi við útinnan. Uppgávan umfatar eisini tilhoyrandi útiøki.

Heildarráðgevingaravtala kemur aftur í nevnd og væntast at verða klár í seinasta lagi í apríl 2023.

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- At góðkenna byggiskrá, sum fyriliggur.
- Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 15. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, við tí viðmerking at byggitíðin verður partur av kappingartreytunum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt.

# 264/22 Íbúðarbygging undir Fjalli matr. nr 1108 og 1107, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2022 | 209/22 | 22/05694-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 280/22 | 22/05694-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 264/22 | 22/05694-1 |

**Upprunin til málið**
Fólkavøksturin heldur á fram, og seinasta ári hevur fólkavøksturin í høvusstaðarøkinum verið 1,5%, ið svarar til 350 fleiri persónar. Nógv er bygt seinastu árini, men tað vísir seg ikki at nøkta tørvin, ið er. Býurin veksur, og byggilendini gerast færri í tali, tá hugsað verður um bygging innanfyri verandi bý. Enn eigur kommunan grundstykkir, sum í almennu byggisamtyktini eru løgd av til bústaðarbygging. Ein útbjóðing til bústaðarbygging á hesum matriklunum stuðlar undir visjónina í bústaðarpolitikkinum, at kommunan framhaldandi útvegar lendi til bústaðarbygging.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at fara undir at bjóða tríggjar matriklar út til bygging av íbúðum. Talan er um matr.nr. 1108,1107 og part av matr.nr. 1166c undir Fjalli, Tórshavn, *kortskjal*.

Ikki er tað nakað nýtt at byggja bústaðir í nevnda øki. Í 2018 gjørdu Ove Mortensen Arkitektavirkið og Arkitektar 99 uppskot til heildarætlan fyri økið, sí skjal *Presentatión 11-10-2018 TK.*

Endamálið við heildarætlanini var, at samskipa alt økið so, at skilagóður samanhangur verður millum ymisku økini, og samstundis gera eina yvirskipaða ætlan fyri skipan av økinum, í mun til ferðslu, vegir, grøn øki og slag av bygging.

Matriklarnir liggja í markinum millum tann bygda býin og hagan, og tískil sklu vegur og tekniskar leiðingar leggjast til stykkið. Matriklarnir liggja tó tætt við gerandishentleikar, so sum Glasir, Skúlan á Fløtum og Bónus, ið liggja undir 500 metrar frá økinum. Matriklarnir liggja í brattlendi, og byggingin í økinum skal sostætt leggja seg í lendið, á ein hátt, sum byggir uppundir og undirstrikar landslagið. Økið er upplagt til høga bygging og ynskiligt er, at Íbúðarhúsini skulu verða skiftandi í skurði, við høgari takreisn og vaksa í hædd upp móti fjallasíðuni.

Matriklarnir liggja í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu í A2- øki, ið er lagt av til høga bústaðarbygging. Teir eru til víddar;

Matr. nr. 1107:13.414 m².
Matr. nr. 1108: 7.577 m².
Matr. nr. 1166c: 5014 m². Ynskiligt er, at ein partur av matriklinum, skal fara til fríøkið til komandi íbúðarbygging á ognunum omanfyri.

Tórshavnar kommuna hevur fingið virðrismett ognirnar sí niðanfyri.

| Matr. nr. | Adressa. | Vídd | Viðm. | Byggisamtykt. |
|---|---|---|---|---|
| 1107, 1108 og 1170, Tórshavn. | | 35.779 | Bústaðarøki. | A2. Høg Bústaðarbygging. |
| Tórshavnar kommuna. | | | | |

| | Mett virði kr. | kr/m2. |
|---|---|---|
| Skyn | 28.623.200,00 | 800 |
| Betri Heim. | 22.000.000,00 | 615 |
| Meklarin | 40.000.000,00 | 1.118 |
| Miðjal. | 30.207.733,33 | 844 |

Út frá kanningini eru hesar treyir settar útbjóðingini av nevndu matriklum:

- at byggjast skulu íbúðir á matr.nr 1108 og 1107, Tórshavn
- at frílendi til útstykkingina verður á parti av matr.nr. 1166c, ið liggur niðanfyri 1107
- at byggingin ikki kemur at framstanda sum kassar við monotonum framsíðum
- at vegatkoma til útstykkingina verður eftir Gráasteinsgøtu
- at gøtufarleið skal verður knýtt í Rossagøtuna, oman gjøgnum 1107 og 1166c og bundin í Marknagilsvegin.
- at komandi eigarin og útstykkjarin tekur á seg allan kostnað av at gera veg eftir Gráasteinsgøtu, gjøgnum matr. nr. 1108 og 1107 og yvir til matr. nr. 1170, Tórshavn

Kommunan eigur eisini matrikkul 1170, sum somuleiðis liggur í A2-byggisamtyktarøkinum, har byggjast kunnu íbúðarhús í fleiri hæddum. Við treytini omanfyri tryggjar kommunan sær, at tað ber til uttan kostnað at binda í vegin, um útstykkjað verður á matr.nr. 1170 seinni.

Aðrar fortreytir, útbjóðingartreytir og formligar treytir í sambandi við útbjóðingina, og so statt útstykking á matr.nr. 1107, 1108 og 1166c, verða settar ávíkavist í útbjóðingartilfari og í sambandi við eina komandi byggimálsviðgerð. Tað verði seg treytir um sølu, bygging og byggilist, orkuskipan og viðurskifti s.s. kloakk, burturbeining av yvirflatu- og spillvatni v.m.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri umráðispartarnar A2 í 3. grundumráði eru:

1. *Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í samband við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva.*

2. *Útstykking til tílíka bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt natturliga avmarkað øki.*

3. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.*

4. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8.*

5. *Hús kunnu einans verða bygd við í mesta lagi 5 hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m mált til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

-

**Skjøl**
22/05694-2 Kortskjal
22/05694-2 Presentatión 11-10-2018 TK.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at bjóða matr.nr. 1107, 1108 og 1166c út til bygging av íbúðum, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Birgir Nielsen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum, men mælir til, at økið verður sett av til bygging av eldrabústøðum umframt vanligur bústøðum í einum møguligum samstarvi við Bústaðir.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Birgir Nielsen, Ruth Vang og Kristian Martini Skála.

Blankt atkvøddu: Jón Kragesten og Turid Horn.

# 265/22 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 37/21 | 21/02196-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 160/21 | 21/02196-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 188/21 | 21/02196-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.11.2021 | 70/21 | 21/02196-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 297/21 | 21/02196-2 |
| 6 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 302/21 | 21/02196-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 26.04.2022 | 37/22 | 21/02196-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 27.04.2022 | 120/22 | 21/02196-2 |
| 9 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 99/22 | 21/02196-2 |
| 10 Fíggjarnevndin | 12.05.2022 | 123/22 | 21/02196-2 |
| 11 Býráðsfundur | 12.05.2022 | 104/22 | 21/02196-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 60/22 | 21/02196-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 253/22 | 21/02196-2 |
| 14 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 244/22 | 21/02196-2 |
| 15 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 265/22 | 21/02196-2 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at samráðingar hava verið millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um at kommunan tekur á seg at gera nýggjan uttara ringveg við íbindingum til Tórshavn er gjørd avtala millum partarnar um, at Føroya landsstýri letur Tórshavnar kommunu stuðul til part av verkætlanini.

**Lýsing av málinum**
Nýggjur uttari ringvegur í Tórshavn hevur verið í umbúna í mong ár og serliga síðani farið var undir at fyrireika Eysturoyartunnilin.

Landsverk hevur arbeitt við at fyrireika henda veg, og í hesi fyrireiking er linjuføring fyri vegin løgd og knútapunkt á linjuføringini staðsett (sí kort í fylgiskjølum). Vegurin verður gjørdur millum rundkoyring oman fyri Sandvíkarhjalla (C) og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð (G). Á hesum strekkinum verða knútapunktini C1, C2 og C3, sum eru íbindingar til millum knútapunkt C og knútapunkt E, sum er rundkoyring við Villingadalsvegin/Sundsvegin. Úr knútapunkti E verður tunnil til knútapunkt F, sum er vestan fyri Hotel Føroyar. Í knútapunkti F verður gjørd rundkoyring, sum hevur fýra greinar: Ein í tunnilin, ein oman í knútapunkt G og tvær til Landið at føra ferðsluna til ávikavist Oyggjarvegin og til Sandoyarleiðina.

Alt vegastrekkið millum punkt B og G verður kommunalur vegur.

Samlaði kostnaðurin er mettur til at vera 288 mió. kr.

Stuðulin frá landinum verður í mesta lagið 110 mió. kr., sum ásett er í løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár.

Stuðulin er treytaður av, at

- arbeiðið við nýggja uttara ringvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út.
- Nýggi uttari ringvegur skal lúka krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá meginøkinum. Hetta er tó ikki galdandi í tíðarskeiðum, tá vegarbeiði og tílíkt verður gjørt.
- Alt vegastrekkið skal haldast frítt fyri forðingar, sum t.d. ferðslubungur, soleiðis at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Nýggjar íbindingar í nýggja uttara ringveg kunnu bert gerast til vegir, sum eru ætlaðir til bilferðslu; ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein veg, sum bara er ætlaður bilferðslu, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki verða hildnar. Útgoldin stuðul kann tó ikki verða kravdur afturgoldin, tá løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn er farin úr gildi.
- Fíggjarmálaráðið kann tinglýsa hesa avtalu á matrikulin, tá nýggi uttari ringvegurin er liðugur.

Avtalan er víðari treytað av, at Løgtingið samtykkir uppskotið til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn, og at Tórshavnar Býráð samtykkir og fremur verkætlanina sambært ásetingum í løgtingslógini og sambært avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um Fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.

Umsitingin kannar alt tøkt verklagstilfar, forkanningar og alt annað tilfar, sum Landsverk hevur framleitt í sambandi við hesa verkætlan, og sum uttan viðurlag verður latið Tórshavnar kommunu sambært avtaluni.

Byggiskrá verður gjørd við støði í úrslitinum av hesum kanningum, og arbeiðið at fremja verkætlanina verður boðið út av umsitingini sum heildarverkætlan, antin fyri:

- Alla verkætlanina samlað,
- ella fyri vegir og tunnil hvør sær.

Umsitingin arbeiðir í hesum sambandi eisini við at finna fíggingarleist fyri kommununnar part av verkætlanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Innkomuvegur yvirlit, j.nr. 21/02196-4
Avtala_FMR_TK, j.nr. 21/02196-1
LI_uttararingveg, j.nr. 21/02196-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Biðið verður um 1 mió. kr. til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyri standandi fyrireikingar.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato: juni-des 21 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 1.000.000 | 8175 | L81037 | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við:

- avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.
- at umsitingin fær heimild til at gera byggiskrá fyri heildararbeiðstøku.
- at umsitingin fær heimild til at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku fyri:
  - Alla verkætlanina samlað,
  - ella fyri vegir og tunnil hvør sær.
- Umsitingin fær játtað ein fíggjarkarm á kr. 1.000.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, L81037, Innkomuvegur kommunali partur, til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyristandandi fyrireikingar.
- Málið soleiðis verður samtykt og beint víðari í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at partar av vegnum/tunnilin kann bjóðast út í innbodnari licitatión.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at projektering av tunli og vegum skal gerast, er tørvur á at umsetingini verður heimilað at gera hesar sáttmálar. Í hesum sambandi er tørvur á einum samlaðum karmi á kr. 3.500.000. Hesin karmur er treyt fyri, at projekteringin av innkomuvegnum og tunli kunnu fremjast og gerast liðug. Skotið verður upp, at afturat teimum kr. 1.000.000 og kr. 751.000, sum áður eru játtaðar og framfluttar frá 2020 til verkætlanina L81037 Innkomuvegur kommunalur partur, verða játtaðar kr. 1.750.000, sum ikki verða avgreiddar av ymiskum øðrum kontum og verkætlanum í 2021:

- 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
- 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
- 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
- 250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við at:

- Umsitingini verður heimilað at gera sáttmálar um projektering av innkomuvegi og tilhoyrandi tunli innan ein samlaðan karm á kr. 3.500.000
- Karmurin til projektering verður fíggjaður av:
  - Verandi tøkari upphædd á L81037 Innkomuvegur kommunalur partur
  - 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
  - 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
  - 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
    250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tekniska nevnd 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at arbeiðið verður fíggjað av íløguætlan fyri 2022 (Innkomuvegur).

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Turið Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg

**Ískoyti**:
Fyrsti partur av uttara ringvegi, ið er arbeiðsvegur frá á Hjalla til Villingadagsvegin, varð boðin út og lægsta boð à kr. 17.272.128 uttan MVG, hevði Articon.
Fyri at seta arbeiðið í gongd, verður biðið um fylgjandi játtan:

| | |
|---|---:|
| • Tilboð | 17.272.128 |
| • Verkætlanarleiðsla, eftirlit og byggileiðsla | 1.000.000 |
| • Avleiddar verkætlanir | 5.600.000 |
| • 6,25 MVG | 1.492.008 |
| | |
| Tilsaman | 25.364.136 |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður av lægsta tilboðnum frá Articon, at játtaðar verða kr. 25.364.136 til verkætlanina, fyrsti partur av uttara ringvegi, kr. 4.600.000 av LK81037 og kr. 20.764.136 sum eykajáttan og beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 26. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at kr. 20.764.136,00 verða játtaðar av mettum meirinntøkum í 2022. Um metingarnar ikki halda, verður fíggingin løgd fyri aftur, møguliga sum lántøka. Málið beint í býráðið sum eykajáttan hvat viðvíkur upphæddini á kr. 20.764.136,00.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:** Fyri at tryggja so stuttan flutning av grevstrartilfarinum sum gjørligt, er gjørt uppskot um avtalu við festaran á Hoyvíkshaganum Norðaripartur um at taka ímóti avlopstilfari, sum ikki verður brúkt í verkætlanini. Fyri hetta skal festarin fáa somu upphædd fyri rúmmeturin, sum annars verður kravdur í tyrvingarplássinum í Húsahaga.

Samlað er talan um ein kostnað á uml. kr. 2.150.000,00, sum ikki er íroknaður í útboðnum og givna tilboðnum ísv. verkætlanina.

Harumframt hevur verkætlanin varandi neiliga ávirkan á raksturin av festinum, tá lendið, sum festið hevur ræði á, verður lagt undir vegin og avleiddar verkætlanir umframt komandi vinnuútstykkingina í økinum. Festarin missir tá bit til seyð, undirlendi til ungneyt umframt fría atkomu til bitið. Harumframt verða skipanirnar av verandi fylgjum og gongum ávirkaðar við eyka avbjóðingum til festaran sum avleiðing. Umsitingin metir og er samd við festaran, at ein eingangssamsýning til festaran á kr. 1.500.000,00 er hóskandi samsýning fyri hesar neiligu ávirkanir á raksturin av festinum.

Avtalurnar við festaran hava við sær, at neyðugt er at hækka játtanina, ið samtykkjast skal við aðru viðgerð, úr kr. 20.764.136,00 upp í kr. 24.424.136,00.

**Tilmæli:** Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja uppskotið við aðru viðgerð við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 24.424.136,00 av meirinntøkum í 2022 og annars taka undir við fyriliggjandi avtalum við festaran.

**Fíggjarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. mai 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevi kommununar hevur eftir avtalu við kommununa projekterað tunnilin lidnan til høvuðsarbeiðstøku og vegurin frá rundkoyringini við Hvítanesvegin til tunnlismunnan undir Brúnni er projekteraður soleiðis, at geometri og krøv eru gjørd klár til heildararbeiðstøku – her er talan um ein lidnan projekteraðan ráveg, tað vil siga at vegkassin er liðugt projekteraður, meðan yvirbygnaður, leiðingar, avvanding, ljós búgvar o.s.fr. ikki eru liðugprojekterað, men krøvini fyri projektering av teimum eru sett upp.

Neyðugt er, at arbeiðstøkurnar fyri tunnil og veg fylgjast, soleiðis at tilfar úr tunlinum í mestan mun kann verða flutt beinleiðis úr tunlinum til vegin. Eisini verður mett, at tað er ein avgerandi fyrimunur fyri logistikkin í samlaðu verkætlanini um einans ein arbeiðstakari er fyri bæði tunnil og veg. Hetta krevur, at útboð og lisitatión fyri tunnil og veg eru samtundis.

Tunnilsgerðin inniber nógv arbeiði í sambandi við vatntrygging og bergtrygging, sum hóast tunnil hevði verið heildararbeiðstøka, helst høvdu verið avroknað øðrvísi. Tí verður mælt til, at tunnilin verður boðin út sum høvuðsarbeiðstøka. Vegurin, hinvegin, er betri egnaður at bjóða út sum heildararbeiðstøka, men vil hesin útboðsformurin krevja longri tíð, áðrenn lisitatión kann haldast fyri hesa arbeiðstøkuna. Hesi viðurskifti gera, at mett verður at besti útboðsháttur fyri samlaðu verkætlanina er, at tunnil og rávegur verða boðin út fyrst, sum høvuðsarbeiðstøka, meðan vegurin verður liðugt projekteraður til útboð til høvuðsarbeiðstøku.

Mett verður at hetta projekteringsarbeiðið saman við neyðugum kanningum verður gjørt innan ein karm á kr. 1.500.000,-. Undir hesum eru eisini neyðugar støðukanningar av verandi brúgvum, sum framhaldandi verða partur av uttara ringvegi, og projektering av broytingum av hesum brúgvunum. Hetta arbeiðið verður mett at kostað um kr. 350.000,-.

Arbeiðið verður mett at verða liðugt og klárt at bjóða út um ársenda 2022. Tó eigur at verða sett tann treyt, at farast kann ikki undir projekteringina av lidnum vegi, áðrenn Tórshavnar býráð hevur samtykt at fara undir tunnil og veg, sum lýst omanfyri.

Tó eigur at kunna farast undir at gera støðukanningar av brúgvunum beinanvegin og projektera broytingar av teimum í mun til lidnan veg.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | 8175 | 81037 | Innkomuvegur | | 1.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022/2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til, at samtykt verður at heimila umsitingini at:
1. Bjóða ráveg og tunnil út sum høvuðsarbeiðstøku
2. Gera sáttmála við ráðgevan um detailprojektering av vegaverkætlan frá rundkoyringini við Hvítanes til Tunnilsmunnan undir Brúnni innan eina rammujáttan á kr. 1.500.000,-, treytað av at Tórshavnar býráð samtykkir at taka av tilboði um ráveg og høvuðsarbeiðstøku. Tó eru støðumeting og projektering av broytingum av verandi brúgvum undantikin hesi treyt innan eina kostnaðarrammu upp til kr. 350.000,-
3. at peningurin verður játtaður av konto 8175 Vegir (íløgur), L81037 Innkomuvegur

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Heðin Mortensen legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til at taka undir við málinum sum samtykt við fyrstu viðgerð við teirri broyting, at pkt. 3 verður soljóðandi:

«3. at peningurin verður játtaður av konto 8175 Vegir (Íløgur), L81037 Innkomuvegur, av inntøkum frá avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan ringveg í Tgórshavn, frá 26. mai 2021.»

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

Uppskotið soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

# 266/22 Marknaumskipan millum matr. nr. 216a, 216b og litra, Kollafirði í sambandi við gerð av gongubreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.06.2019 | 44/19 | 19/01811-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 97/19 | 19/01811-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 197/19 | 19/01811-2 |
| 4 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 169/19 | 19/01811-2 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 19/01811-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 282/22 | 19/01811-2 |
| 7 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 266/22 | 19/01811-2 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsókn frá eigaranum av matr. 216b í Líðini í Kollafirði, sum eisini eigur matr. 216a, um kommunan kann keypa/yvirtaka geiran uppá 150 fermetrar, sum liggur úti á almennum vegi. Umsóknin er um at kommunan rindar fyri íbindingargjald til helvtina av matr. 216a, sum er umleið 1040 fermetrar hvør helvt, í staðin fyri at keypa geiran.

- Kostnaður er umleið 19.788 kr. fyri íbindingargjald til tað eina stykkið og kostnaður til Umhvørvisstovuna fyri matrikuleringina er umleið 3.500 kr.

- Um kommunan selur honum stykkið, kostar tað kommununi 16.500 kr., tá er tað roknað út frá 110 kr. pr. fermetur og kemur gjald til Umhvørvisstovuna fyri marknaumskipanina afturat, sum er umleið 3.500 kr.

Tekniska deild metir, at tað er umráðandi, at kommunan fær økið talan er um, um kommunan í framtíðini fer at gera eina gongubreyt.

Ætlanin er at sundurbýta matr. 216a í tvey stykkir og um umsøkjarin kann fáa eina skrivliga avtalu í lag um at kommunan kann rindar fyri leiðingina og matrikuleringina til tað eina stykkið, áðrenn umsøkjarin sundurbýtir matr. 216a í tvey stykkir.

Tekniska deild hevur verið á ástaðarfundi hesum viðvíkjandi og gjørt eina munnliga avtalu um at kommunan kann rinda fyri íbindingargjald og matrikuleringina í staðin fyri at kommunan keypir økið, um nevndin samtykkir tað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1 í almennu byggisamtyktini.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki mál sum hevur týdning.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Onki frávik.

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
Kort yvir økið, sum søkt verður um at marknaumskipa j. nr. 19/01811-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla til, at kommunan ognar sær umleið 150 fermetrar av matr. 216b og 216a til gongubreyt og at kommunan rindar fyri íbinding og matrikulering til ta einu helvtina, tá sundurbýtið er framt og kommunan ger eina skrivliga avtalu við umsøkjaran.

**Tekniska nevnd 04. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# Ískoyti:

Tórshavnar kommuna ynskir enn at ogna sær áleið 150 fermetrar av matr. 216b og 216a til gongubreyt. Á fundi hava eigarar gjørt vart við at tey ynskja, at kommunan rindar fyri íbindingargjald til bæði sundurbýttu grundstykkini og matrikuleringina í staðin fyri at kommunan rindar fyri keypið av økinum.

Marknaðarvirði á áleið 150 fermetrum í Kollafirið er: 150 fermetrar x 500 kr = 75.000 kr

Íbindingargjald fyri áleið fyri bæði grundstykkini er áleið:
- 900 fermetrar = 17.010 kr avrundað til kr. 17.500,-
- 1000 fermetrar = 18.900 kr. avrundað til kr. 19.000,-

35.910 kr. avrundað til kr. 36.500,-

Umhvørvisstovan hevur upplýst at sambart *Kunngerð nr. 14 frá 11.februar 2009 um gjøld eftir matrikullógini,* er kostnaðurin fyri sundurbýti og marknaumskipan áleið 15.000 kr.

Kostnaðurin fyri lendi til gongubreyt verður áleið kr. 51.500,- harav kr. 15.000 skulu rindast matrikkulstovuni. Restin uml. Kr. 36.500 er íbindingargjald, sum kommunan « rindar « ella man kann siga, í hesum føri, ikki krevur frá eigara.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til, at kommunan ognar sær áleið 150 fermetrar frá matr. 216b og 216a til gongubreyt og at kommunan rindar fyri íbinding til bæði frábýttu stykkini og stendur fyri kostaðinum fyri matrikulering. Mælt verður eisini til at kommunan ger eina skrivliga avtalu við eigarar, sí skjal nr. 19/01811-8.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt.

# 267/22 Útskifting av maskinu til jarnplássið hjá Kommunalu Brennistøðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.05.2022 | 24/22 | 22/01300-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 283/22 | 22/01300-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 267/22 | 22/01300-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 22/01300-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunala Brennistøðin hevur 2 maskinur (G01 og G04), ið eru ætlaðar til at handfara og avskipa jarn. Maskinan, sum undir avskipan er á jarnplássinum (G04), er nú vorðin so niðurslitin, at hon er lívshættislig og ikki megnar arbeiðið. Seinastu avskipingarnar hevur tí verið neyðugt at líta á vælvild frá øðrum við maskinum til arbeiðið. Tó er bara møguligt at leiga maskinur frá øðrum, tá tær eru til taks. Tað ger avskiping av jarni ov viðbrekna, tí neyðugt er at avskipa, tá jarnprísurin er hægstur.

**Lýsing av málinum**
Maskinan, sum er á jarnplássinum, ein Sennebogen 830E (G04), er hon, sum skilir og klippir jarn og føðir pressuna. Hon er á donskum fakmáli ein “materialehåndterer” og er sergjørd til endamálið. Maskinan hevur júst røttu støðd og røkkur akkurát tað, sum hon skal. Eisini kann stýrhúsið lyftast upp. Tað ger, at førarin sær, hvat ið hann arbeiðir við, og kann hyggja niður í pressuna og ísv. at lastbilar verða fyltir. Maskinan er frá 2007 og sostatt 15 ára gomul. Hon hevur koyrt 12.578 tímar, er uppslitin, og nú vorðin vandamikil fyri føraran. Tað loysir seg ikki at umvæla hana. Saksurin má eisini skiftast.

Hin maskinan, ein Sennebogen 835E (G01) er størri. Hon kann laga kroystar bilar og annað jarn upp í rúgvur. Hetta er neyðugt fyri at kunna gagnnýta goymsluøkið og har kunna savna nóg nógv jarn saman til eina avskipan og at kunna stýra, nær man avskipar, og soleiðis fáa besta prís fyri jarnið. Tann størra maskinan er ov stór til tað vanliga arbeiðið við at føða jarnpressuna, m.a. tí at hon hevði komið í SEV-leiðingina, sum hongur yvir einum parti av arbeiðsøkinum kring pressuna. Í sambandi við avskipan av jarni má tann størra maskinan vera á keiini; bummurin røkkur so mikið langt, at maskinan kann leggja jarnið niður í lastina. Eingin onnur maskina er í landinum, sum er egnað til avskipan av jarni, ei heldur til størri lossingaruppgávur. Tí verður hon eisini eftirspurd og nýtt til aðrar uppgávur upp á rokning.

Um tann minna maskinan ikki verður útskift, ber ikki til at leiga ta størru maskinuna út til onnur arbeiðir.

Aðrir møguleikar eru kannaðir fyri ta minnu maskinuna, sum má útskiftast. Tó hevur eingin onnur maskina víst seg at nøkta tørvin og krøvini til arbeiðið. Eisini eru førararnir á innleigaðu maskinunum ikki vanir at arbeiða við avskipan av jarni. Tí megna teir ikki at arbeiða nóg skjótt, so avskipaða jarnmongdin verður ov lítil. Hetta ger, at tað fyri hvørja avskipan fæst minni av jarni við skipunum, sum verða leigað fyri ávíst daga- og tímatal. Úrslitið er, at kostnaðurin fyri at avskipa hvørt tons av jarni økist óneyðuga nógv, og Brennistøðin og við hesum Tórshavnar kommuna missir inntøkur.

Eisini er tað bara møguligt at leiga maskinur frá øðrum, tá ella um tær yvirhøvur eru til taks. Tað er meiri enn so komið fyri, at leigaðu maskinurnar eru gingnar fyri stutt áðrenn ella undir arbeiðinum. Tað ger avskiping av jarni við leigaðum maskinum ov viðbrekna, tí neyðugt er at kunna útføra arbeiðið, tá jarnprísurin er hægstur, og skip eru tøk.

Mælt verður tí til, at tann minna maskinan (G04) verður útskift við eina nýggja, og at maskinurnar hjá Kommunalu brennistøðini til avskipan av jarni eru í stýrdari eftirlits- og viðlíkahaldsskipan, sum gjaldsavtala verður gjørd um við kommunala verkstaðið.

Kannað verður eftir, um tað ber til at keypa og nýta eina elektriska maskinu til endamálið. Fyribilskanningar vísa, at sami veitari, Sennebogen kann veita eina elektriska maskinu fyri um 300.000 kr. hægri kostnað enn við dieselmotori. Tann maskinan hevur ikki innbygt battarí, og kann sostatt bert arbeiða við el-kaðali. Áðrenn endalig støða verður tikin, er neyðugt at kanna, hvat ið krevst fyri, at tað skal bera til, um tað er møguligt at fremja arbeiðini, sum maskinan skal brúkast til við el-kaðali hangandi úr maskinuni. Eisini er neyðugt at samskifta við avvarandi myndugleikar um trygdarviðurskiftini hesum viðvíkjandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi
Kunngerð nr. 128 frá 4. september 1995 um lyftiútgerð og spøl (kranar)
Bekendtgørelse nr. 1109 af 15. december 1992 om anvendelse af tekniske hjælpemidler
Kunngerð nr. 8 frá 13. februar 2002 um innrætting av føstum arbeiðsplássum
Lógir og kunngerðir um el og trygd í hesum sambandi, sí arb.fo/eltrygd-log-og-kunngerdir

**Upplýsingar frá umsitingini**
Jarnprísurin er óvanliga høgur í løtuni, og tí verður mett, at rúmd er í rakstrinum til at nýta ein part av søluinntøkunum av jarni í 2022 til at fíggja útskiftingina av G04. Mett verður, at kostnaðurin av at útskifta maskinuna vinnur seg inn aftur í væntaðu livitíðini hjá maskinuni.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Inntøkur.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Býarverkfrøðingurin, Fríður Pállsson Dalsgarð, og leiðarin á Kommunala verkstaðnum, Atli Simonsen taka undir við leistinum. Frameftir verður alt kravt og tilmælt viðlíkahaldseftirlit framt stundisliga og skrásett í skipanini hjá verkstaðnum. Fyrisitingin leggur ein leist fyri gjaldsavtalu millum brennistøð og verkstað um hetta.

**Skjøl**
22/01300-1 Viðmerkingar frá kommunala verkstaðnum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin fyri Kommunalu Brennistøðina mæla til, at tann minna maskinan (G04) verður útskift við eina nýggja. Jarnprísurin er óvanliga høgur í løtuni, og tí verður mælt til at nýta ein part av søluinntøkunum av jarni til at fíggja útskiftingina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. mai 2022:** Nevndin tekur undir við tilmælinum og heitir á umsitingina um at fáa øll rakstrartólini í verkstaðsskipanina hjá kommunala verkstaðnum og gera eina viðlíkahaldsavtalu.

**Ískoyti**
Í samband við samtyktina frá 3. mai 2022 verður neyðugt, at samtyktar verða flytingar millum kontur til tess at fáa til vega pening at keypa umrøddu maskinu. Hetta verður gjørt við at flyta kr. 2.000.000 av deild 7110 Renovation, konto 71010 Skrottviðgerð til deild 8375 Rakstrargøgn (Íløgur), nýggj konto: 'Nýggj maskina til tilfarshandtering'.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 7110 | 71020 | Skrottviðgerð | 8375 | | Nýggj maskina til tilfarshandteri ng | Ja | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 2.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 100.000 |

**Tilmæli:**
Teknsiski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini, leiðarin á Brennistøðini, leiðarin á Verkstaðnum og býarverkfrøðingurin mæla til at heimiðla verður at:

1. Peningur frá sølu av skrottjarni kr. 3.000.000 verður fluttur frá deild 7110 Renovatión, L71020 Skrottviðgerð til deild 8375 Rakstrargøgn, nýggj verkætlan 'Nýggj maskina til tilfarshandtering'.
2. Verkstaðið keypir inn maskinu sum lýst í málinum til nýtslu í Renovatiónini.
3. Gjørd verður viðlíkahaldsavtala millum Verkstaðið og Renovatiónina um hesa maskinu og øll onnur rakstargøgn í Renovatiónini

Mælt verður til at málið verður beint víðari í Býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir sum eykajáttanarmál.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt.

# 268/22 Dagføring av reinsiverkinum í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.05.2022 | 46/22 | 22/02522-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 162/22 | 22/02522-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 148/22 | 22/02522-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 12.09.2022 | 56/22 | 22/02522-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 07.11.2022 | 71/22 | 22/02522-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 281/22 | 22/02522-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 268/22 | 22/02522-1 |

**Upprunin til málið**
Vatnverkið í Havnardali hevur í longri tíð trongt til at blivið dagført og møguliga nýtt vatnreinsiverk bygt. Í 2008 var verkætlan gjørd hesum viðvíkjandi og kostnaðarmeting gjørd. Mett var tá, at kostnaður av verkætlanini var ov høgur til at farið kundi verið undir hesa verkætlan tá, og varð verkætlanin tí slept.
Vatnverkið er síðani tá vorðið 14 ár eldri, og eru onkrar smærri ábøtur gjørdar hesi árini, men tað er ein sannroynd, at reinsikapasiteturin á verandi vatnverki ikki er nøktandi til verandi nýtsluna, og tí er vatnið úr hesum verkinum ofta dálkað og krevur tað tá, at borgarar kóka vatnið, til reint er aftur.

**Lýsing av málinum**
Verandi vatnverk, ið varð tikið í brúk í 1966, er í dag ov lítið og ótíðarhóskandi og tá vatngoymslan í Havnardali er og verður álitið viðv. vatnveiting til býin, er ikki ov tíðliga at taka upp aftur arbeiðið, at fyrireika dagføring av verkinum.

Býurin veksur skjótt, og serliga í Hoyvíkshaganun, har íbúðarøkini liggja á so høgari kotu, at vatnveitingin har má koma úr Villingadali.

Vatnveitingin úr Villingadali er avmarkað vegna lítla avfallsøkið og sum kunnugt høvdu vit stórar trupulleikar á sumri 2000, tá byrgingin varð um at verða tóm.

Neyðugt verður fyrr ella seinni at knýta størri part av niðaru Havnini uppí Havnardalsverkið, sum helst kann lata vatn upp til eina kotu á 105 m.

Krøvini til drekkivatn gerast alt meira umfatandi, og mugu vit altíð vera uppá forkant.
Í 2007 búðu 13.000 fólk á tí øki, sum verkið í Havnardali kann lata vatn til. Økist fólkatalið í hesum øki til 15.000 og hvør íbúgvi nýtur 400 l. Pr. dg. gevur tað 15,000 X 0,4 $m^3$ = 6.000 $m^3$/dg.

Vatnnýtslan á eystara- og vestara kaiøki við sínum virkjum og skipaferðslu kunnu koma upp í 100 $m^3$ av vatni um tíman í eitt døgn.

Hetta samanlagt gevur ein vatntørv uppá 8.400 $m^3$ um døgnið ella 350 $m^3$ um tíman.
Verður eitt vatnverk bygt við eini reinsiorku uppá 400 $m^3$/h, skuldi tørvurin verið nøktaður fleiri ár fram.

Krøv og ynskir til nýggja reinsiverkið kunnu í stuttum sigast at vera hesi:

1. Liggja á leið har gamla verkið er, og á so høgari kotu so gjørligt.
2. Hava eina reinsiorku uppá 400 $m^3$ um tíman, og eina reintvatnsgoymslu til 2000 $m^3$.
3. Vera einstreingjað, 1 X 400 $m^3$, í mun til Villingadal, sum er tveystreingja, 2 X 300 $m^3$
4. Lúka øll altjóða krøv.
5. Hava sama bygna sum verkið í Villingadali, men tó við broytingum.

*Galdandi lógir o.a. fyri økið.*
Økið úti í Havnardali, talan er um, er í 4. grundumráði.

Í 4. grundumráði er bert loyvt at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðabrúk at gera
Eisini stendur at hús og onnur bygging skulu vera soleiðis vorðin og verða sett soleiðis í landslagið, at tey lýta sum minst.

Hetta merkir, at serligt byggiloyvi má fáast, og at friðingarmyndugleikar koma inn í myndina.

Viðv. verandi vatnverki og innsavningarøkinum í Havnardali er at siga, at tey fingu løggilding frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni 05.07.1996 við nummarinum 5101002.

Eisini kann nevnast, at avvarðandi bøndur í Havnardali hava fingið skriv, har tað verður álagt teimum at taða á slíkan hátt, at tað ikki ávirkar vatnbyrgingina á nakran hátt.

Fyri at á skjótasta hátt, at fáa nærri greinað og lýst, hvussu Vatnverkið í Havnardali kann dagførast, ella nýtt vatnverk kann gerast í sambandi við byrgingina í Havnardalið metir umsitingin, at tikið eigur at verið aftur í verkætlanina frá 2007 við tí endamálið, at kanna hvørjar tillagingar kunnu gerast í hesi verkætlan fyri at fáa til vega eina verkætlan, sum kann gjøgnumførast. Umsitingin metir, at slík ráðgeving kann gerast innan ein karm á kr. 400.000, sum verað funnar innan løgukarmin LK67005 Vatnreinsiverk í Havnardali á konto 6775 Vatnveiting (Løgur)

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
2004-0389, 2007-3388 og 2008-0642

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 400.000 av konto 6775 Vatnveiting (Løgur), løgukarmur LK67006 á løgukonto L67005 undir somu høvuðskonto og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið við teirri rætting, at talan er um at játta kr. 400.000,00 av konto 6775 Vatnveiting (Løgur), løgukarmur LK67005.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Umsitingin hevur biðið SMJ gera eitt upprit til projektering av einum nýggjum vatnreinsiverki í Havnadali, sum lýkur øll krøv til eitt kommunalt vatnreinsiverk á norðulendskum stigi.

Uppritið tekur støði í *J.nr. 2007-3388/1 "Uppskot til byggiprogram*", sum tá var liðugt projekterað, men var ov kostnaðarmikið.

Nýggja vatnreinsiverkið vil vera bíligari at gera við at raðfesta funktionalitet framum design og sekunderan funktionalitet, sum størri rúm varð givið fyri í uppskotinum til byggiprogram í 2008. Á fundinum verður greitt frá úrslitunum í uppritinum. Av tí at verandi reinsiverk er frá 1966, og tørvur hevur í longri tíð verið á, at verkið verður dagført ella skift út, er átroðkandi at arbeitt verður skjótt víðari fram móti hesum endamáli.

Av tí at SMJ hevur arbeitt við málinum í 2007 og 2022, er tað mest skynsamt at teirra arbeiði heldur áfram.

**Skjøl:**
J. nr. 2007-3388/1: Uppskot til byggiprogram
J. nr. 22/02522-5: Upprit um nýtt reinsiverk í Havnadali

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og Býarverkfrøðingurin mæla til, at heimild verður givin til at biðja SMJ um tilboð uppá projektering av nýggjum vatnverki við støði í nýggja uppritinum frá SMJ, og at málið verður lagt aftur fyri nevndina, tá tilboðið fyriliggur.

**Tekniska nevnd 12. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur móttikið tilboð frá SMJ um prosjektering av nýggjum vatnreinsiverki í Havnardali, samsvarandi við uppritið, sum varð latið kommununi (12.07.2022).

Tilboðið er býtt sundur í fasur: Skipanaruppskot, prosjektuppskot, myndugleikaprosjekt, høvuðsprosjekt og eftirfylgjandi byggileiðslu v.m.

Samlaði kostnaðurin er 7,72 mió. kr fyri alt, og fyri skipanaruppskotið eittans er kostnaðurin kr 756.560

Tikið kann verða av tilboðnum í stigum.

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja**

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |

| **Upphædd** |
|---|

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6775 | LK67005 | Dagføring av reinsiverkinum í Havnardali | 6775 | L67005 | Dagføring av reinsiverkinum í Havnardali | Nei | | 600.000 kr |
| 6775 | L67001 | Vatnbyrging í Kollafirði | 6775 | L67005 | Dagføring av reinsiverkinum í Havnardali | Nei | | 16.400 kr |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin, mæla til

- at taka av tilboðnum um skipanaruppskot.
- at flyta 600.000 kr av løgukarmi LK67005 og 16.400 kr av løgu L67001 yvir á løgu L67005 "Dagføring av reinsiverkinum í Havnardali" til at fíggja skipanaruppskotið
  og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Tekniska nevnd 07. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt.

# 269/22 Eykajáttan av meirinntøkum 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.11.2022 | 295/22 | 22/06615-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 269/22 | 22/06615-1 |

**Upprunin til málið**
Inntøkurnar í 2022 eru hægri enn upprunaliga mett og gevur hetta møguleika fyri at hækka fíggjarætlanina í árinum. Eykajáttanir skulu vera samtyktar við 2. viðgerð innan 31. desember í fíggjarárinum.

**Lýsing av málinum**
Nýggjastu metingarnar av samlaðu inntøkunum fyri 2022 vísa, at meirinntøkurnar koma at verða umleið 76 mió.kr. 37 mió.kr av hesum, er staðfestar meirinntøkur av partafelagsskatti, sum er grundaður á ársroknskapirnar í 2021.

Kommunuskatturin verður mettur at blíva 17 mió.kr hægri enn mett upprunaliga. Haraftrat skal leggjast árliga reguleringin fyri árið fyri, ið vanliga kemur í oktober í inniverandi ári. Í ár er hon 15 mió.kr. Skatturin av eftirlønarinngjøldum verður mettur 8 mió.kr hægri enn upprunaliga mett.

Av mettu meirinntøkunum eru játtaðar 31,2 mió.kr. Aftan á hesar játtanir er eitt avlop á 45 mió. kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Borgarstjórin mælir til, at 45,1 mió.kr av meirinntøkunum fyri 2022 verða nýttar til at fíggja niðanfyri standandi løgur og rakstur.

| **Íløgur** | |
|---|---|
| Vøllur í Hoyvík | 5.000 |
| Høllin á Hálsi | 2.000 |
| Fótbóltsvallir, Argir-Hoyvík, Ljós | 3.000 |
| Lendisgøtur | 4.000 |
| Viðarlund í Dalinum langa | 7.000 |
| Smábátahavn Álakeri | 600 |
| Hoydalar | 1.000 |
| Dagføring kommunalir bygningar | 3.000 |
| | 25.600 |

| **Rakstur** | |
|---|---|
| 2460 Stuðul og verkætlanir innan almannamál | 500 |
| 4140 Skúlaætlan | 1.000 |
| 5365 Stuðul til ítrótt | 1.000 |
| 5370 Stuðul til íløgur | 5.500 |
| §5 Stuðul til størri listarligar verkætlanir | 1.000 |
| 6110 Dagstovnar garðar | 1.000 |
| 6110, Altan á Boðanesheiminum | 1.000 |
| 7311 Vinnuverkætlanir, Filmsvinnan | 1.000 |
| 7510 Bussleiðin | 2.500 |
| 7710 Ferðavinnan | 2.000 |
| 8112 Asfalt | 3.000 |
| **Íalt** | **19.500** |
| | |
| **Eykajáttan tilsamans** | **45.100** |

**Fíggjarnevndin 23. november 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið krevur tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Gunvør Balle, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til, at 10 mió. kr. av meirinntøkunum, ið eru settar av til íløgur, verða brúktar til at útvega fleiri dagstovnapláss.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari atkvøðu og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Jón Kragesteen, Turid Horn, Kristian Martin Skála, og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Ruth Vang.

# 270/22 Fíggjarætlan 2023, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2022 | 245/22 | 22/04851-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 216/22 | 22/04851-1 |
| 3 Heilsu- og eldranevndin | 04.10.2022 | 16/22 | 22/04851-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 05.10.2022 | 198/22 | 22/04851-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 06.10.2022 | 63/22 | 22/04851-1 |
| 6 Vinnunevndin | 06.10.2022 | 28/22 | 22/04851-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.10.2022 | 40/22 | 22/04851-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.10.2022 | 191/22 | 22/04851-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 17.10.2022 | 69/22 | 22/04851-1 |
| 10 Havnanevndin | 17.10.2022 | 28/22 | 22/04851-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 267/22 | 22/04851-1 |
| 12 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 249/22 | 22/04851-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 23.11.2022 | 296/22 | 22/04851-1 |
| 14 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 270/22 | 22/04851-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 27. oktober og aðru viðgerð 24. november.

**Lýsing av málinum**

**Fortreytir fyri fíggjarætlan 2023**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2023 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 8.000 kr.

Kendar framskrivingar og virksemisbroytingar eru tiknar við.

Virksemisbroytingar eru til dømis sáttmála- og lógarbundnar broytingar, ávirkan á rakstrarkostnaðir av nýggjum íløgur og íløgum, ið koma ístaðin fyri aðrar umframt samtyktar og ætlaðar broytingar í virksemi og tænastustøði.

Í talvuni niðanfyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| | | Roknskapur 2021 | Ætlan 2022 | Ætlan 2023 | Broyting 2022/2023 pst | kr |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | tkr | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 900.238 | 920.000 | 957.000 | 4,0% | *37.000* |
| 20601 | Felagsskattur | 63.667 | 35.000 | 30.000 | -14,3% | *-5.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 534 | 2.000 | 1.000 | -50,0% | *-1.000* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 167.889 | 169.386 | 185.000 | 9,2% | *15.614* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.074 | 35.659 | 35.659 | 0,0% | *0* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.168.402** | **1.162.045** | **1.208.659** | **4,0%** | ***46.614*** |
| | | | | | | |
| **Rakstrarútreiðslur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 93.348 | 96.888 | 101.323 | 4,6% | *4.435* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 285.546 | 300.872 | 313.195 | 4,1% | *12.323* |
| §3 | Børn og ung | 203.387 | 217.381 | 225.072 | 3,5% | *7.691* |
| §4 | Undirvísing | 50.001 | 47.159 | 51.843 | 9,9% | *4.684* |
| §5 | Mentan og frítíð | 71.286 | 62.956 | 64.635 | 2,7% | *1.679* |
| §6 | Teknisk mál | 156.650 | 147.142 | 152.107 | 3,4% | *4.965* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 76.319 | 77.039 | 85.700 | 11,2% | *8.661* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -41.702 | -32.353 | -40.070 | -23,9% | *-7.717* |
| | **Rakstur íalt** | **894.835** | **917.084** | **953.806** | **4,0%** | ***36.722*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.403 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 1.938 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **20.341** | **20.000** | **20.000** | **0,0%** | ***0*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **253.226** | **224.961** | **234.854** | **4,4%** | ***9.892*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 176 | 800 | 651 | -18,6% | *-149* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.700 | 4.482 | -21,4% | *-1.218* |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | -409 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | | -500 | | |
| | **Rentur íalt** | **585** | **6.500** | **5.633** | **-13,3%** | ***-867*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **252.640** | **218.461** | **229.221** | **4,9%** | **10.759** |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **1.234** | **1.234** | **1.234** | 0,0% | *0* |
| | **Avdráttir TH** | | **19.900** | **15.873** | -20,2% | *-4.027* |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **251.406** | **197.327** | **212.114** | **7,5%** | **14.786** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **209.704** | **190.574** | **192.899** | **1,2%** | **2.324** |

Búskaparráðið hevur nýliga lagt sína heystfrágreiðing fram, og metir Ráðið fyri 2023 ein búskaparvøkstur, tvs vøkstur í bruttotjóðarúrtøkuni BTÚ, upp á 2,6% í leypandi prísum.

Ráðið hevur samstundis saman við Hagstovuni endurskoðað vakstrartølini fyri ávikavist 2021, 2022 og 2023. Fyri 2022, sum Ráðið í fjør metti til 3,3%, er metingin nú 11,2%, sum er ein munandi hækking. Stóra hækkingin er merkt av stóra prísvøkstrinum, ið serliga man standast av krígnum í Ukraina. Ein vøkstur

roknaður út í leypandi prísum er ikki reinsaður fyri prísvøkstur. Mett verður, at prísvøksturin er 7,3%-stig av teim 11,2%'unum.

Hagstovuni vantar enn hetta amboðið - ein BTÚ-deflator - ið kann reinsa BTÚ fyri prísvøkstur, so at vøksturin eisini kann vísast í føstum prísum.

Ráðið sigur annars um føroyska búskapin, at tað framvegis er ferð á. Stóra virksemið hevur við sær lágt arbeiðsloysi og trot á arbeiðsmegi í bæði privat og almenna geiranum. Lønargjaldingarnar eru høgar, og tal av løntakarum higartil í 2022 setir met. Vøruhandilin við útheimin gevur framvegis avlop.

Hækkingin í brúkaraprístalinum fyri til dømis annan ársfjórðing í ár er tó tann hægsta í Føroyum seinastu 14 árini. Fyri at tálma prísvøkstrinum hava miðbankar kring heimin hækkað rentuna. Sum alt annað líka vil tálma nýtsluni hjá húsarhaldunum.

Enn sæst ikki nøkur munandi nýtsluminking her á landi, og flestu húsarhøld sigast av bankunum at vera væl fyri. Men handilsvinnan sigur frá einum minni eftirspurningi av húsbúnaði og marglætisvørum.

**INNTØKURNAR**
Hóast fyrst koronu og síðani kríggið í Ukraina kann sigast, at inntøkurnar hjá kommunni hava verið á einum jøvnum stigi.

Mett verður tó ráðiligt at hava eina varna meting av vøkstrinum í kommunuskatti millum annað við hækkingunum í vøruprísum og rentuni í huga. Av somu orsøk verður eisini felagsskatturin, skatturin frá partafeløgum, mettur varliga.

Inntøkumetingin av **kommunuskattinum** fyri 2023 er gjørd við støði í staðfestu inntøkunum fyrstu átta mánaðar í 2022 og fíggjarætlanartølini síðstu fýra mánaðarnar. Oman á samlaða metta talið fyri 2022 upp á 938 mió.kr eru løgd 2,00%. Inntøkurnar vaksa tá 4,0% ella 37,0 mió.kr upp í 957 mió.kr fyri 2023 í mun til 920 mió.kr, ið var metingin fyri 2022.

Inntøkurnar av **skatti av eftirlønarinngjøldum** fyri 2023 eru mettar til 185 mió.kr, sum er 15,6 mió.kr ella 9,2% hægri enn metta talið fyri 2022. Fyri 2021 var staðfesta talið 168 mió.kr.

Inntøkan frá **felagsskattuinum** er fyri 2023 mett at verða 30,0 mió.kr, sum er 5,0 mió.kr lægri enn metingin fyri 2022. Staðfesti felagsskatturin fyri 2021 bleiv annars 63,7 mió.kr, um enn metingin var munandi lægri. Men júst felagsskatturin kann vera torførur at meta um, tí botnlinjurnar hjá partafeløgunum eru til dømis nógv tengdar at vøruinnkeypsprísum og søluinntøkum.

**Samlaðu inntøkurnar** í fíggjarætlaninini fyri 2023 vaksa 46,6 mió.kr ella 4,0% upp í 1.208,7 mió.kr í mun til metingina fyri 2022 upp á 1.162 mió.kr.

**RAKSTRARÚTREIÐSLURNAR**
Virksemið í høvuðsstaðarkommununi er enn í stórum vøkstri.

Fólkatalið í Føroyum veksur støðugt. Størsti vøkstur í tali er í Tórshavnar kommunu. Nú búgva yvir 23.000 fólk í kommununi svarandi til 43% av samlaða fólkatalinum í landinum. Av teimum 23.000 eru 21.000 búsitandi í Tórshavn, Hoyvík og Argjum.

Talið av borgarum í kommununi vaks frá august 2021 til august 2022 við 1,7% ella 387 borgarum upp í 23.071 úr 22.684. Hetta er umleið sami vøkstur sum í fjør. Fólkatalið í øllum landinum vaks sama tíðarskeið 1,3%.

Seinastu 10 árini er talið av borgarum í Tórshavnar kommunu vaksið 3.309 ella 16,7%. Ein sovorðin vøkstur hevur við sær munandi øking í virksmeminum, tænastunum og harvið eisini rakstrarútreiðslunum.

Samanløgdu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununi vaksa í fíggjarætlanini fyri 2023 netto 36,7 mió.kr upp í 953,8 mió.kr úr 917,1 mió.kr. Hetta er ein vøkstur upp á 4,0% í mun til fíggjarætlanina fyri 2022.

**Lønir eru størsti partur av rakstrarkostnaðunum**
Av samlaða bruttokostnaðinum eru lønirnar 60% og 75% av nettokostnaðunum. Til komandi ár eru lønirnar mettar at vaksa 29,7 mió.kr ella 4,7% í mun til fíggjarætlan fyri 2022. Í fjør vuksu lønirnar í fíggjarætlanini nakað meira: 32,3 mió.kr ella 4,94% í mun til fíggjarætlan 2021.

Av vøkstrinum fyri 2023 eru 16 mió.kr lønarhækkingar ísv sáttmalar. Harafturat er tað vøksturin í virksemi, ið økir um lønirnar við 13,7 mió.kr.

Sí talvuna niðanfyri.

| | **Grein** *tús.kr* | **Lønar-hækking** | **Lønar-øking** | **Íalt** |
|---|---|---|---|---|
| § 1 | Kommunal fyrisiting | 2.373 | 2.207 | 4.580 |
| § 2 | Almanna- og heilsumál | 7.244 | 3.463 | 10.707 |
| § 3 | Børn og ung | 3.529 | 2.057 | 5.586 |
| § 4 | Undirvísing | 356 | 3.008 | 3.364 |
| § 5 | Mentan og frítíð | 857 | 2.240 | 3.097 |
| § 6 | Teknisk mál | 1.843 | 262 | 2.105 |
| § 6 | Kommunal virkir TK | 909 | 410 | 1.319 |
| | | **17.111** | **13.647** | **30.758** |

**Høvuðsútreiðslutøl á greinunum**

Á **§ 1 Kommunual fyrisiting** økjast nettoúreiðslurnar 4,6% ella 4,4 mió.kr. Størsti parturin av vøkstrinum er orsakað av sáttmálabundnum lønarhækkingum og virksemisbroytingum í samband við val og valnevndir. Tvey val verða komandi ár.

Nettoútreiðslurnar á **§ 2 Almanna- og heilsumál** økjast íalt við 4,1% ella 12,3 mió.kr, herav knappar 9 mió.kr er hækking í lønum, ið serliga stavar frá *eldraøkinum.*

*Kommunulæknatænastur* vaksa við 978 tkr, sum er ein hækking á 13,8%.

*Barnavernd* økist 1,05 mió.kr ella 15,6%. *Børn sett heiman í fosturfamlìju* hækkar 1,7 mió.kr ella 8,9%. Av hesum er hækking í lønum 0,9 mió.kr. *Brúkaragjøld, serstovnar* lækkar 1,8 mió.kr, ið er ein hækking á 35%.

*Eldraøkið* stendur fyri størstu hækkingini í upphædd innan almanna- og heilsumál. *Konta 2720 Heilsuhúsið* hækkar 1,3 mió.kr svarandi til eina hækking á 3,6% orsakað av hægri prísum. *Konta 2721 Røktartænastur* hækkar 7,1 mió.kr svarandi til eina hækking á 4,5%, øll upphæddin er lønir. *Konta 2722 Tilboð* hækkar við 1,6 mió.kr, ið er ein hækking á 4,0%, alt lønir.

Nettoútreiðslurnar á **§ 3 Børn og ung** fylgja í høvuðsheitum barnatalinum og økjast 7,7 mió.kr ella 3,5%.

*Útreiðslurnar í teim fýra eindunum, B-A-R-N* økjast netto 4,6 mió.kr ella 2,8%. Barnatalið minkar við 15 í vøggustovunum, 55 í barnagørðunum og 112 fleiri børn í frítíðarskúlunum. Lagt er ikki upp fyri nýggjum útreiðslum til møguligt hægri barnatal. Fleiri forskúlatilboð verða eftir summarið 2023, og tí verður ein forskjóting ímillum grein 3 og 4 eins og ímillum barnagarðsbørn og frítíðarskúlabørn til forskúla.

Foreldragjaldið er óbroytt 27%.

*Útreiðslurnar til systkinaavsláttur* økjast 845 tkr ella 5,6% mett út frá útreiðslunum í 2022.

Nettoútreiðslurnar á **§ 4 Undirvísing** hækka 4,7 mió.kr ella 9,9%. Játtanin fylgir metta næmingatalinum. Nýggir forskúlar eru skipaðir frá sumrinum 2023 í Eysturskúlanum, Velbastaðar skúla, Kollafjarðar skúla og Kaldbaks skúla. Harumframt eru broytingar í lønum til skúlaleiðarar í hesum skúlum í samband við við forskúla. Játtan til reingerð er stillað hjá Skúlanum á Fløtum og Eysturskúlanum. Eisini eru stovningarútreiðslur í samband við nýggjar 8. flokkar í Santa Frans skúla. Játtanin til frítíðarskúla til forskúla hækkar, samstundis sum játtanin til barnagarðsstovur hækkar samsvarandi barnatalinum.

Nettoútreiðslurnar á **§ 5 Mentan og frítíð** hækka 1,7 mió.kr ella 2,7%. Størsta broytingin er hækkingin av játtanini til *kontu 5717 Ítróttaranlegg* á 10,5% ella 1,6 mió.kr, mestsum alt lønir. Játtanin til Kvøldskúlan hækkar 610 tkr ella 14,9% ísv økta undirvísing í føroyskum sum annað mál.

Nettoútreiðslurnar á **§ 6 Teknisk mál** økjast við 3,4% ella 5,0 mió.kr. *Konta 6110 Umsiting og røkt av bygningum, egið rakstrarstað* hækkar 1,5 mió.kr ella 4,6% orsakað av hækkaðum fermetrartali í ítróttarhallum. *Kontan 8114 Kavarudding* hækkar 1,7 mió.kr ella 51,8% í tráð við søguligan kostnað fyri hvønn frostdag og tal av frostdøgum.

Nettoútreiðslurnar á **§ 7 Kommunal virkir, frároknað Tórshavnar havn** økjast við 11,2% ella 8,6 mió.kr. *Konta 7110 Renovatión* veksur 21,3% ella 5,0 mió.kr. Talan er um eina resthækking vegna árligt gjald ísv tyrving á Nýggjheiðum í Kvívík. Eisini er mist inntøka á 600 tkr. *Konta 7510 Bussleiðin* hækkar 2,8 mió.kr samsvarandi nýggjum sáttmála og 2,5 mió.kr ov lítið búskettera í 2022.

-----

Í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 234,9 mió.kr.

Úrslit áðrenn avdráttir og íløgur verður 229,2 mió.kr.

Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá Tórshavnar kommunu verður 192,9 mió.kr.

Lániskuldin hjá kommununi er 242 mió.kr. Av hesum eru 233 mió.kr knýttar at Tórshavnar havn.

Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðu íløgurnar, má munurin fíggjast við meiri inntøku og/ella lægri útreiðslum og/ella lántøku.

Býráðið ásetir kommunuskattaprosentið og barnafrádráttin og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina.

### Skjøl
Yvirlit yvir sáttmálabundnar íløgur.

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

**Fíggjarnevndin 28. september 2022:** Framlagt.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Víst verður til fílreferansu: Yvirlit yvir ferðavinnupolitikk j.nr. 20/00089-61, 60 og 32.
**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. oktober 2022:** Framlagt.
**Heilsu- og eldranevndin 04. oktober 2022:** Framlagt.
**Mentamálanevndin 05. oktober 2022:** Fíggjarætlanin og notat um fíggjarætlanina lagt fram. Vísandi til tað samtykkir nevndin at broyta mettu barnatølini fyri grein 3 og tillaga upphæddina samsvarandi.
**Trivnaðarnevndin 06. oktober 2022:** Fíggjarætlanin og notat um fíggjarætlanina lagt fram.
**Vinnunevndin 06. oktober 2022:** Framlagt.
**Havnanevndin 17. oktober 2022:** Fíggjarætlanin og notat um fíggjarætlanina lagt fram.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2022:** Framlagt.
**Tekniska nevnd 17. oktober 2022:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Staðfestur felagsskattur í 2022 er 69,8 mió. kr. Felagsskatturin, sum fellur til gjaldingar í 2022, er álíknaður á teir roknskapir, har inntøkuárið fellur saman við ella endar í 2021. Í núverandi uppskoti til fíggjarætlan er felagsskatturin mettur til 30 mió.kr. Felagskatturin kann vera torførur at meta um, men sum gongdin er í búskapinum, verður mett ráðiligt at hækka partafelagsskattin til 60 mió.kr.

Fyri 2023 sigur nýggjasta metingin frá Fíggjarmálaráðnum av eftirlønarskattinum, at hesin verður 2 mió.kr hægri enn upprunaliga mett.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fyrisitingarstjórin mæla til at hækka konto 20601 Felagskattur við 30 mió. kr. og at hækka konto 20801 Skattur av eftirlønargjøldum við 2 mió. kr. Samanlagt hækka inntøkurnar 32 mió. kr.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:**

Fyri 2023 sigur nýggjasta metingin frá Fíggjarmálaráðnum av eftirlønarskattinum, at hesin verður 6,862 mió.kr hægri enn upprunaliga mett. Í uppskotinum til fíggjarætlan er hesin posturin 185 mió.kr, og verður her skotið upp at hækka talið til 191,86 mió.kr.

Inntøkur í samband við DIS/FAS/frádráttir verða eisini mettar nakað hægri. Hesar hækkað við 762 t.kr. til 36,4 mió. kr.

Partafelagsskatturin er hækkaður við 30 mió. kr. til 60 mió. kr. sostatt verða inntøkurnar 37,6 mió. kr. hægri enn upprunaliga mett.

Játtanin á konto 1210 Val og valnevndir verður nýtt til at rinda útreiðslur í sambandi við val. Í uppruna uppskotinum til fíggjarætlan, var peningur settur av til fólkatingsval og løgtingsval.
Hesi eru bæði útskrivaði í 2022 og peningur játtaður til endamálið. Játtanin í 2023 lækkar við 1,14 mió.kr.

Tørvur er at dagføra útrokningarlyklar til rakstur á dagstovnaøkinum. Víst verður til samtykt í mentamálanevndini 9. November 2022 um broyting í útrokningarlyklinum. Játtanin hækkar í hesum sambandi við 1,6 mió. kr.

Játtanin á §3 Børn og ung og §4 Undirvísing fylgir barnatalinum. Nýggjar metingar eru av barnatalinum, mælt verður til at játtanin verður laga til dagførda barnatalið. Játtanin lækkar við 981 t.kr.

Samlaða broyting í rakstrinum, íroknað inntøkur verður 38,1 mió.kr. Við hesum broytingum verður úrslit áðrenn rentur 273 mió.kr. Úrslit av rakstri og rentum, men áðrenn avdráttir og íløgur, verður 267,3 mió.kr. Avlop til skattafíggjaðar íløgur verður 231 mió.kr. Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðu íløgurnar, má munurin fíggjast. Ætlanin er at fíggja innkomuvegin 74,5 mió.kr. við lántøku. Við hesum verður íløgukarmurin hjá Tórshavnar kommunu uttan Tórshavnar havn 305,6 mió. kr.

Í talvuni niðanfyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2021 | Ætlan 2022 | 2023 | Broyting 2022/2023 pct. | kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 900.238 | 920.000 | 957.000 | 4,0% | *37.000* |
| 20601 | Felagsskattur | 63.667 | 35.000 | 60.000 | 71,4% | *25.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 534 | 2.000 | 1.000 | -50,0% | *-1.000* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 167.889 | 169.386 | 191.862 | 13,3% | *22.476* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.074 | 35.659 | 36.421 | 2,1% | *762* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.168.402** | **1.162.045** | **1.246.283** | **7,2%** | ***84.238*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 93.348 | 96.888 | 100.179 | 3,4% | *3.291* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 285.546 | 300.872 | 313.189 | 4,1% | *12.317* |
| §3 | Børn og ung | 203.387 | 217.381 | 225.917 | 3,9% | *8.536* |
| §4 | Undirvísing | 50.001 | 47.159 | 51.617 | 9,5% | *4.458* |
| §5 | Mentan og frítíð | 71.286 | 62.956 | 64.635 | 2,7% | *1.679* |
| §6 | Teknisk mál | 156.650 | 147.142 | 152.107 | 3,4% | *4.965* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 76.319 | 77.039 | 85.700 | 11,2% | *8.661* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -41.702 | -32.353 | -40.070 | -23,9% | *-7.717* |
| | **Rakstur íalt** | **894.835** | **917.084** | **953.274** | **3,9%** | ***36.190*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.403 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 1.938 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **20.341** | **20.000** | **20.000** | **0,0%** | ***0*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **253.226** | **224.961** | **273.009** | **21,4%** | ***48.048*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 176 | 800 | 651 | -18,6% | *-149* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.700 | 4.482 | -21,4% | *-1.218* |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | -409 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | | -500 | | |
| | **Rentur íalt** | **585** | **6.500** | **5.633** | **-13,3%** | ***-867*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **252.640** | **218.461** | **267.376** | **22,4%** | **48.915** |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **1.234** | **1.234** | **1.234** | 0,0% | *0* |
| | **Avdráttir TH** | | **19.900** | **15.873** | -20,2% | *-4.027* |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **251.406** | **197.327** | **250.269** | **26,8%** | **52.942** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **209.704** | **190.574** | **231.054** | **21,2%** | **40.480** |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. november 2022 | Blað nr.: 1046<br><br>Formansins merki: |

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til niðanfyristandandi broytingar av fíggjarætlanini:

| **Deild** | **Navn** | **Broyting** |
|---|---|---|
| | **Inntøkur og rentur:** | |
| 20601 | Felagsskattur | 30.000 |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 6.862 |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 762 |
| | **Hækking í inntøkum** | **37.624** |

| **Deild** | **Navn** | **Broyting** |
|---|---|---|
| | **Rakstur:** | |
| 1210 | Val og valnevndir | -1.143 |
| 3105 | Eind N | -756 |
| 3102-3106 | Broyttir lyklar á dagstovnaøkinum | 1.600 |
| 4113 | Velbastaðar skúli | 5 |
| 4114 | Kaldbaks skúli | 32 |
| 4115 | Kollafjarðar skúli | 13 |
| 4117 | Skúlin á Fløtum | -49 |
| 4118 | Eysturskúlin | -53 |
| 4119 | Sankta Frans skúli | 19 |
| 4120 | Hoyvíkar skúli | -8 |
| 4121 | Skúlin á Argjahamri. | 15 |
| 4122 | Skúlin við Løgmannabrey | 23 |
| 4125 | Frískúlin Lítliskúli | -216 |
| 4126 | Forskúli í Lítlaskúla | -6 |
| | **Lækking íalt** | **-524** |

| | | |
|---|---|---|
| | **Samlað broyting í rakstri, íroknað inntøkur** | **38.148** |

Harumframt mælir borgarstjórin fíggjarnevndini til, at samtykkja niðanfyri standandi íløguætlan fyri 2023. Málið verður beint í býráðið til 2. viðgerð.

| | | | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | J | J | J | J | F |
| **§2** | | **Almanna- og heilsumál** | **28.000** | **67.000** | **9.000** | **9.000** | **17.000** |
| 2375 | LK23002 | Tannlæknamiðstøð | | | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 2775 | | Tjarnargarður | 12.300 | 10.000 | | | |
| 2775 | | Umlættingar- og rehabiliteringsdepil | 15.700 | 57.000 | | | |
| 2775 | LK27012 | Nýtt røktarheim við røktaríbúðum | | | 4.000 | 6.000 | 15.000 |
| 2775 | LK27013 | Eldradepil í Kollafirði | | | 2.000 | 1.000 | |
| 2775 | LK27013 | Røktarheim uttanumøki | | | 2.000 | 1.000 | 1.000 |
| | | | | | | | |
| **§3** | | **Børn og ung** | **10.000** | **18.200** | **8.000** | **34.000** | **7.000** |
| 3175 | | Dagstovnar, uttanum øki | 10.000 | 18.200 | | | 1.000 |
| 3175 | LK31013 | Nýggjur dagstovnur á Argjum | | | 1.000 | | |
| 3175 | | Umbygging í Kongagøtu | | | 5.000 | | |
| 3175 | LK31015 | Tillagingar á dagstovnaøkinum | | | | 4.000 | |
| 3175 | LK31014 | Frítíðarskúlin við Botnánna í Kollafirði | | | 2.000 | | |
| 3175 | LK31011 | Útbygging dagstovnurin á Hamrinum | | | | 30.000 | 5.000 |
| 3175 | | Dagføring frítíðarskúlar | | | | | 1.000 |
| | | | | | | | |
| **§4** | | **Undirvísing** | **90.000** | **116.000** | **0** | **3.900** | **22.500** |
| 4175 | LK41013 | Dagføring, Hoyvíkar skúli | | | | 2.000 | 1.000 |
| 4175 | | Skúlin á Argjahamri serstova | | | | | 1.500 |
| 4175 | LK41014 | Dagføring, Skúlin við Løgmannabreyt | | | | 1.900 | |
| 4176 | | Skúlin á Fløtum | 90.000 | 116.000 | | | |
| 4176 | | Framhaldsdeild í Sankta Frans | | | | | 20.000 |
| | | | | | | | |
| **§5** | | **Mentan og frítíð** | **31.400** | **17.500** | **88.500** | **94.500** | **123.500** |
| 5175 | | Musikkskúli | 24.000 | | | | 1.000 |
| 5275 | LK52002 | Kvøldskúlin | | | | 2.000 | |
| 5575 | LK55001 | Býarsavn | | | 1.500 | | |
| 5475 | LK54001 | Býarbókasavn | | | | 2.000 | |
| 5775 | LK57026 | Tórsvøllur | | | | 13.000 | |
| 5775 | LK57015 | Langhylur | 4.400 | 4.000 | 65.000 | 40.000 | 60.000 |
| 5775 | LK57033 | Byrsumúli/skjótibreyt | | 3.000 | 5.000 | 5.000 | |
| 5775 | LK57016 | Golf | | 3.500 | 4.000 | 4.500 | 2.500 |
| 5775 | LK57036 | Vøllur í Hoyvík | | 1.000 | 2.500 | | |
| 5775 | LK57037 | Tórsbreyt | | 1.000 | 500 | | |
| 5775 | | Ítróttaranlegg | 3.000 | 5.000 | | | |
| 5775 | | Ovari vøllur | | | 4.000 | | |
| 5775 | LK57039 | Fótbóltsvallir, Argir-Hoyvík, Ljós | | | | 10.000 | |
| 5775 | | Niðari vøllur/vøllur á Argjum | | | 3.000 | | |
| 5775 | LK57038 | Stórhøll | | | 1.000 | 10.000 | 50.000 |
| 5775 | | Venjingarhøli í Kollafirði | | | 1.000 | | |
| 5775 | LK57018 | Fimleikahøll/Borgarahús í Kaldbak | | | 1.000 | 5.000 | 10.000 |
| 5775 | LK57040 | Gundadalshøllin | | | | 1.000 | |
| 5775 | LK57041 | Innandura spælipláss | | | | 1.000 | |
| 5775 | LK57042 | Frælsur ítróttur | | | | 1.000 | |
| 5775 | | Høllin á Hálsi | | | | | |
| | | | | | | | |
| **§6** | | **Teknisk mál** | **26.000** | **21.700** | **52.400** | **83.100** | **130.700** |
| 6175 | LK61010 | Umsiting og røkt av fastari ogn - Keyp av Kurlu | | | 2.100 | 1.200 | 1.200 |
| 6175 | LK61011 | Umsiting og røkt av fastari ogn - Søla | | | -3.100 | -3.100 | |
| 6177 | LK61706 | Fjarhitafelagið | | | | 15.000 | |
| 6177 | | ESCO – Orku- og umhvørvistiltøk | 3.000 | | | | |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur - átøk | | 5.000 | 4.000 | 8.000 | 8.000 |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 5.000 | 5.000 | 3.000 | 5.000 | 3.000 |
| 6275 | LK62998 | Fríðkan, bygdir og økir | | | | 2.000 | 1.000 |
| 6275 | LK62997 | Lendisgøtur | | | | 4.000 | |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6275 | LK62995 | Spælipláss, Grasagarð, Glaðsheygg o.a. | | | | 5.000 | |
| 6275 | LK62050 | Viðarlundin, træplanting o.a. | | | | 1.000 | |
| 6275 | LK62034 | Miðbýarætlan/Vágsbotnur | 4.000 | | 3.000 | | |
| 6275 | LK62038 | Standmynd av Andreu Áting | | | | | 1.000 |
| 6275 | LK62996 | Miðbýarætlan | | | | 8.000 | 10.000 |
| 6275 | LK57036 | Torg frammanfyri FSF | | | 5.000 | | 2.000 |
| 6275 | LK62048 | Torg í Hoyvík | | | | 1.000 | 2.000 |
| 6275 | LK62042 | Gamla grótbrúgvin um Sandá í Havnadali | | | 2.500 | | |
| 6275 | LK62049 | Vetrarfriðing í Kollafirði og Nólsoy | | | 700 | 1.000 | |
| 6275 | LK62040 | Súkklugøtur og skýli | | 1.000 | 1.000 | | |
| 6275 | LK62032 | Fiskastykkið - Bukkvald | | | 500 | | |
| 6475 | | Byggibúning, Karlamagnussarbreyt | 3.000 | | | | |
| 6475 | LK64019 | Útstykking oman fyri Argjahamar, útreiðslur | | | | | 30.000 |
| 6475 | LK64019 | Utstykking oman fyri Argjahamar, inntøkur | | | | | -30.000 |
| 6575 | LK65004 | Kirkjugarðar | 4.000 | 4.000 | 3.200 | | |
| 6575 | | Kapellið | | | | | 5.000 |
| 6775 | LK67004 | Vatnverk í Kollafirði | | | 4.000 | | |
| 6775 | LK67005 | Vatnreinsiverk í Havnardali | | | | 1.000 | 1.000 |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 2.000 | 3.000 | 6.000 | 8.000 | 8.000 |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | | | 12.500 | 8.000 | 6.000 |
| 8175 | LK81043 | Parkeringstunnil | 5.000 | | 4.000 | | 3.000 |
| 8175 | LK81998 | Parkering | | | | 3.000 | |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur, útreiðsla | | | | 10.000 | 108.000 |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur, inntøka | | | | | -33.500 |
| 8175 | | Landavegur | | 3.700 | | | |
| 8175 | LK81044 | Karlamagnussarbreyt | | | 4.000 | | |
| 8375 | LK83001 | Rakstrargøgn | | | | 5.000 | 5.000 |
| **§7** | | **Kommunal virki** | **3.200** | **17.200** | **16.000** | **25.000** | **5.100** |
| 7175 | | Renovatión | | | 1.000 | | |
| 7175 | LK74007 | Renovatión, skiljihøll | | | | 7.000 | 1.600 |
| 7375 | | Talgilding Føroyar | | 5.600 | | | |
| 7476 | LK74010 | Smábátahavn Álakeri | 1.200 | 10.000 | 15.000 | 18.000 | |
| 7476 | | Bylgjubrótari Kollafirði | | 1.600 | | | |
| 7476 | | Smábátahavn | 2.000 | | | | 3.500 |
| | | **Samanlagt TK** | **188.600** | **257.600** | **173.900** | **249.500** | **305.800** |
| 7475 | | Tórshavnar havn | 100.000 | 63.000 | 36.000 | 24.000 | 20.000 |
| 7475 | | Fyrireiking av landstreymi | | 3.700 | | | |
| | | **Samanlagt** | **288.600** | **324.300** | **209.900** | **273.500** | **325.800** |

**Fíggjarnevndin 23. november 2022**: Samtykt at taka undir við tilmælinum frá stjórnini um broytingar í inntøkum og rakstri sum lýst omanfyri.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur harumframt undir við framløgdu íløguætlanini omanfyri.

Ein minniluti, Gunvør Balle, tekur ikki undir við framløgdu íløguætlanini og vísir á, at Tjóðveldi fer at leggja fram broytingaruppskot hesum viðvíkjndi til býráðsfundin.

**Ískoyti:**
Til býráðsfundin leggur tjóðveldi fram niðanfyristandandi broytingaruppskot:

Tjóðveldi hevur hesi uppskot til fíggjarætlan fyri 2023, ið skal samtykkjast á komandi býráðsfundi.

Íløgur:
1. Fara undir arbeiðið at framleiða og reisa standmynd av Andru Árting: 2 mió kr
2. Foreldur sleppa ikki til arbeiðis tí at uml 160 børn eru á bíðilista til vøggustovu- ella barnagarðspláss. Tí er neyðugt at útvega fleiri dagstovnapláss alt fyri eitt

Uppskot: Arbeiðið skal setast í gongd at byggja ein nýggjan dagstovn til uml. 100 børn. Í 2023 skal avgerð takast um staðseting og fara undir projektering: 2 mió kr

Uppskot: Farast skal undir at byggja uppí verandi stovnar, har tað ber til, so nýggj pláss kunnu útvegast skjótt: 15 mió kr

3. Seta ferð á arbeiðið við átøkunum í orkupolitikkinum: 18mió kr
4. Hækka barnafrádráttin frá 8000kr til 10.000kr pr ár fyri hvørt barn

Rakstur:
Uppskot: Hækka normeringina á dagstovnaøkinum við 8 mió kr.

Eftir fakligum tilmæli samtykti eitt samt býráð í november í 2020 at hækka normeringina á dagstovnaøkinum við 36 mió komandi árini, - ella við uml 8 mió árliga komandi 4-5 árini. 13 mió kr eru settar av til hægri normering síðan samtyktina og 8 mió kr eiga at verða settar av í 2023.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Umframt broytingaruppskotið frá umboðunum fyri Tjóðveldi, løgdu Birgir Nielsen og Kristian Martin Skála vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi broytingaruppskot:

Minnilutin Kristian Martin Skála og Birgir Nielsen skjóta upp at lækka kommunuskttin við einum hálvum prosenti og at hækka barnafrádráttin við 1.500 kr. um árið til 9.500 kr. Vit skjóta upp, at skattalættin og økti barnafrádrátturin verður fíggjaður við at skera av støðlaðum íløgum. Kostnaðurin er mettur at vera um 35 milliónmir krónur. Sum er standa 247 milliónir krónur, sum eru játtaðar til íløgur óbrúktar. Vit skjóta upp at skorið verður javnt av hesum ætlaðu íløgum, sum enn ikki eru framdar í verki.

Meirilutin, umboðini hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum løgdu saman við umboðunum hjá Fólkaflokkinum fram soljóðandi broytingaruppskot:

Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin mæla til at hækka barnafrádráttin til kr. 9.000, ið verður at fíggja av konto 5775 langhylur, sum lækkar við 6 mió. kr.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá umboðunum hjá Tjóðveldi, ið fall við trimum atkvøðum fyri, trimum blonkum atkvøðum, og sjey atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Jón Kragesteen, Jákup Dam og Turid Horn.

Blankt atkvøddu: Kristan Martin Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá umboðunum hjá Fólkaflokkinum, ið fall við trimum atkvøðum fyri, tveimum blonkum atkvøðum, og átta atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Ruth Vang, Kristian Martin Skála og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Turid Horn og Jákup Dam.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Jón Kragesteen.

Síðani varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá umboðunum hjá Javnaðarflokkinum, Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum, ið varð einmælt samtykt.

At enda varð atkvøtt um fíggjarætlanina soleiðis broytta og sum samtykt av meirilutanum í fíggjarnevndini, og varð uppskotið einmælt samtykt.

Fíggjarætlanin soleiðis samtykt við aðru viðgerð, skattaprosentið ásett til 19,00 og barnafrádrátturin ásettur til 9.000 kr. pr. barn.

## 271/22 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 57/22 | 22/00009-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 51/22 | 22/00009-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 87/22 | 22/00009-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 74/22 | 22/00009-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 116/22 | 22/00009-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 101/22 | 22/00009-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 138/22 | 22/00009-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 131/22 | 22/00009-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 176/22 | 22/00009-1 |
| 10 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 167/22 | 22/00009-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 215/22 | 22/00009-1 |
| 12 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 192/22 | 22/00009-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 26.09.2022 | 243/22 | 22/00009-1 |
| 14 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 217/22 | 22/00009-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 269/22 | 22/00009-1 |
| 16 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 250/22 | 22/00009-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 290/22 | 22/00009-1 |
| 18 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 271/22 | 22/00009-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni og juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 19:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Jón Kragesteen | Jákup Dam |
| Turid Horn | Kristian Martin Skála | Birgir Nielsen |
| | Ruth Vang | |